# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit .......... 1
**PARTUR I .......... 3**
Framløga løgmans .......... 3
Høvuðsmál í tingsetuni .......... 4
Búskapur .......... 4
Fullveldisætlanin .......... 5
Almanna- og heilsuviðurskifti .......... 5
Vinna .......... 6
Fiskivinna .......... 7
Uttanríkisviðurskifti .......... 7
Kommunu- og útjaðaraviðurskifti .......... 8
Oljuvinna .......... 8
Umhvørvi .......... 9
Útbúgving, gransking og mentan .......... 9
**PARTUR II .......... 11**
Fyrisitingarmál .......... 11
Fyrisitingarpolitikkur .......... 11
Starvsfólkapolitikkur .......... 11
Uttanlandsmál .......... 11
Marknamál .......... 11
Altjóða samstarv .......... 12
Framtíðarstøða Føroya í Evropa .......... 13
Norðurlandamál .......... 13
Kommunumál .......... 14
Fíggjarviðurskifti .......... 15
Kommunulógin .......... 16
Framtíðar kommunubygnaður .......... 16
Sjálvstýrismál .......... 17
1. stig: Politiski málsetningurin .......... 17
2. stig: Kanningar, útgreiningar og fyrireikingar .......... 18
3. stig: Samráðingar .......... 18
4. stig: Demokratisk avgerð .......... 19
Føroysk rættarskipan .......... 19
Løgmál .......... 19
Lógarforum .......... 20
Onnur løgmál .......... 20
Fíggjar- og búskaparmál .......... 21
Búskapargongdin .......... 21
Búskaparpolitikkur .......... 23
Lóggáva .......... 24
Fiskivinnumál .......... 24
Heildarætlan .......... 25
Fiskivinnusamráðingar .......... 26
Fiskiveiðieftirlit .......... 28
Sjóvinna .......... 29

Hvalaveiða ..... 29
Vinnumál ..... 30
Vinnupolitikkur ..... 30
Samskifti ..... 32
Arbeiðsmarknaður ..... 33
Oljumál ..... 33
Umhvørvismál ..... 35
Almanna- og heilsumál ..... 35
Almannamál ..... 35
Heilsumál ..... 38
Undirvísingar- og mentamál ..... 38
Fólkaskúli ..... 39
Miðnám ..... 39
Mentan ..... 41
**PARTUR III ..... 43**
Løglisti ..... 43
Løgmansskrivstovan ..... 43
Fíggjarmálastýrið ..... 43
Fiskimálastýrið ..... 44
Vinnumálastýrið ..... 44
Oljumálastýrið ..... 44
Almanna- og Heilsumálastýrið ..... 45
Undirvísingar- og Mentamálastýrið ..... 45

**Løgmansrøðan er til skjals á heimasíðu landsstýrisins: www.fl.fo**

# PARTUR I

## Framløga løgmans

*Harra formaður*

Hetta er seinasta ólavsøkurøða í hesi øldini og hendan tingsetan røkkur inn í eina nýggja øld og nýtt ártúsund.

Hetta landsstýrið hevur nú virkað í eitt gott ár. Høvuðsmálið er greitt: At seta tryggar karmar um einar fult sjálvstøðugar og sjálvbjargnar Føroyar í næstu øld.

Fyri bert einum ári síðani var torført at síggja longur enn ein dag fram, tí nógvir óloystir trupulleikar skuggaðu fyri øllum útsýni.

Síðani eru stórar broytingar hendar í føroyska samfelagnum:

- Búskaparligu hjólini eru aftur farin at mala.
- Vinnuliga gongur framá bæði á sjógvi og landi.
- Arbeiðsloysið minkar, og fólkatalið veksur støðugt.
- Ein komandi oljuvinna verður fyrireikað.
- Batar eru settir í verk á almanna- og heilsuøkinum og innan skúla, mentan og gransking.
- Arbeitt verður miðvíst við at lýsa krøvini til Føroyar sum eitt land við fullveldi við egnari grundlóg.

Í okkara viðurskiftum við umheimin eru stór og ítøkilig frambrot gjørd:

- Semja er gjørd um endurgjald fyri bankamálið.
- Loysn er funnin á skuldarspurninginum mótvegis Danmark.
- Marknatrætan við Bretland er loyst, og sáttmálin er staðfestur av bretska parlamentinum.
- Handilssáttmáli okkara við ES er betraður munandi.
- Altjóða áhugin fyri Føroyum er stórur, og nógv ynski eru um økt samstarv.
- Harafturat er okkara yvirskot á handilsjavna og gjaldsjavna mótvegis útheiminum stórt.

Kortini er greitt, at nógv stórmál eru eftir at loysa til tess at tryggja eini framhaldandi menning av føroyska samfelagnum.

Tað ber helst til at siga, at vit upp gjøgnum nítiárini fingust við at stýra tí føroysku samfelagsskútuni millum boðar og sker. Vit komu undan verstu grunnbrotunum.

Nú er kósin sett móti sjálvbjargni, og skútan spakuliga farin at sigla. Tí ræður um at halda kósina, og hava stabilititetin í lagi fyri at tryggja allari manningini ein tryggan og góðan túr.

Málið er at fáa eina last og eina barlast, sum vit sjálvi skapa og ikki blaka fyri borð aftur.

**Høvuðsmál í tingsetuni**
Í hesi tingsetuni, sum byrjar í dag, verða óivað eisini stórar politiskar avbjóðingar, m.a.:

- Farast skal undir samráðingar við donsku stjórnina um ein sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt land við fullveldi. Málið er at hava fólkaatkvøðu um ein nýggjan sáttmála næsta ár.
- Fíggjar- og búskaparligar raðfestingar skulu gerast fyri at hava ein so javnan búskap sum gjørligt.
- Ein nýggj, varðandi pensiónsskipan skal viðgerast og setast í verk.
- Ein framtíðar fiskivinnupolitikkur verður orðaður og settur í verk.
- Lóggáva um oljuleiting og útbjóðing skal setast í verk.
- Ein miðvísur útbúgvingar- mentanar- og granskingarpolitikkur skal setast út í kortið og styrkjast.
- Nýggj kommunulóggáva skal viðgerast og setast í verk.
- Munagóð tiltøk til frama fyri økismenning og útjaðaran skulu fremjast.

**Búskapur**
Búskaparvøksturin heldur fram. Hagtølini vísa sum heild vøkstur í øllum vinnugreinum, og innan útflutningsvinnuna er talan um øking í virðinum hóast afturgongd í nøgd.

Hetta er ikki minst tí bøtta vinnuliga kappingarførinum fyri at takka, men lagaliga gongdin í náttúruni og á heimsmarknaðinum eiga eisini sín part av framgongdini. Vit kunnu ikki rokna við, at hesi viðurskifti verða okkum soleiðis til vildar næsta árið.

Stórt trýst er á lønar- og prísleguni. Vandi er fyri, at lønar- og prísvøkstur uppviga hvør annan. Tað bøtir í longdini onki um búskaparstøðuna hjá tí einstaka ella í samfelagnum, men førir einans vánaligari kappingarføri við sær.

Hartil er greitt, at virksemið økist ikki javnt kring landið. Vøksturin og eftirspurningurin síggjast einamest í miðstaðarøkinum og innan ávísar yrkisbólkar.

Tí er alneyðugt, at vit brúka búskaparframgongdina til at konsolidera føroyska búskapin til at gerast sjálvbjargin, og at vit taka økismenningar- og sosial atlit í landsins fíggjar- og búskaparpolitikki.

Landsstýrið ger í løtuni uppskotið til fíggjarlóg fyri ár 2000. Endamálið er at viðgera fíggjarlógina sum part í einum búskaparligum heildarpolitikki við omanfyrinevndu atlitum. Í høvuðsheitum verður miðað ímóti at:

- Útreiðslur landskassans eiga at tálmast.
- Inntøkur landskassans eiga at viðgerast í mun til landskassans útreiðslur og skyldur, eins og vinnuligar konjukturbroytingarnar.
- Almenni íløgukarmurin verður at avtala millum landsstýrið og kommunur og setast í mun til privata íløguvirksemið við atliti at byggivirkseminum í landinum.
- Langtíðarraðfestingar eiga at verða gjørdar á málsøkjunum.

Í samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær fyri at lækka skatt- og avgjøld. Landsstýrið fer tí ikki at tálma búskaparliga virkseminum við at hækka skatt- og avgjøld. Heldur eigur at verða hildið aftur á útreiðslu- og íløgusíðuni á fíggjarlógini.

Sjálvbjargni fyri føroyska búskapin verður ikki tryggjað, fyrrenn vit vísa, at vit megna at reka eitt trygt vælferðarsamfelag uttan ríkisveitingarnar, og at vit støðugt økja um vinnuligu inntøkurnar í mun til almennu útreiðslurnar.

Landsstýrið ætlar at seta heildarveitingina úr Danmark á serliga játtan á fíggjarlógini. Heildarveitingin fer fyrst og fremst til at gjalda rentur og avdráttir við. Harafturat til íløgur, har tørvurin er íkomin av íløgusteðginum, sum kreppan førdi við sær.

Í fyrstu atløgu verður neyðugt at nýta nakað av blokkinum til rakstrarútreiðslur, men málið má verða, at almennu rakstrarútreiðslurnar verða tillagaðar soleiðis, at vit sum frá líður gerast óheft av heildarveitingini.

Fleiri frágreiðingar og hagtøl um føroyska búskapin eru í seinastuni almannakunngjørdar. Frágreiðingarnar eru áhugaverdar og viðkomandi, og eiga hesar tí av tingmonnum at verða tiknar við tá orðaskifti um føroyska búskapin kemur fyri.

**Fullveldisætlanin**
Landsstýrið hevur lagt alstóran dent á, at leiðin til at skipa Føroyar sum eitt land við fullveldi skal byggjast á neyvar fyrireikingar, upplýsing og fólkaræðisliga avgerð.

Grundað á tingsamtyktina frá oktober í fjør er seinasta árið gjørt eitt stórt kanningar- og útgreiningararbeiðið, sum lýsir krøvini til Føroyar sum eitt sjálvstøðugt land.

Eitt stórt tal av fólki í og uttan fyri fyrisitingina hava lagt stóra orku í hetta arbeiðið, umframt at serfrøðingar úr útlondum hava tikið lut. Arbeiðið hevur gingið væl, og úrslitini verða savnað í ”Hvítubók”, sum verður almannakunngjørd um ein mánaða.

Hvítabók, eins og aðrar útgreiningar, skal brúkast sum eitt arbeiðsamboð hjá politikarunum at leggja neyvar politiskar ætlanir. Hesar frágreiðingar geva almenninginum fullgott grundarlag at taka støðu til ætlanirnar.

Ein ætlan verður í løtuni løgd til tess at kunna politikarar, vinnufeløg, yrkisfeløg, áhugafeløg, fjølmiðlar og almenningin annars um arbeiðið og úrslitini í Hvítubók.

Miðað verður ímóti at leggja Hvítubók og landsstýrisins niðurstøður til aðalorðaskiftis á tingi í heyst. Eftir hetta er greitt at gera endaliga samráðingaruppleggið og at fara til samráðingar við donsku stjórnina. Hetta verður gjørt í neyvum samstarvi við uttanlandsnevnd løgtingsins.

**Almanna- og heilsuviðurskifti**
Á almannaøkinum hevur landsstýrið sett sær fyri at gera munagóð framtøk viðvíkjandi lóggávuni og tænastum.

Á pensjónsøkinum er fyrsta stig tikið til at bøta um umstøðurnar hjá teimum eldru. Ein nýggj pensjónslóg er samtykt og kemur í gildi næsta ár. Seinni í ár er ætlanin at leggja fyri tingið uppskot til løgtingslóg, sum ásetir og javnar upphæddirnar sambært pensjónslógini. Pensjónistarnir fara at merkja eina munandi hækking í pensjónsviðbótunum.

Fyrireikingarnar eru byrjaðar til nýggju lóggávuna á almannaøkinum, og verða uppskot til nýggja forsorgarlóg og barnaforsorgarlóg eftir ætlan løgd fyri løgtingið í heyst.

Samstundis verður arbeitt við spurninginum um, hvussu føroyska samfelagið í framtíðini skal megna at tryggja føroyingar fíggjarliga á ellisárum. Her ætlar landsstýrið at bróta upp úr nýggjum við at seta í gildi eina skipan, sum áleggur øllum lønmóttakarum at gjalda til pensjónsuppsparing.

Á barnaansingarøkinum ætlar landsstýrið at broyta lóggávuna soleiðis, at hendan uppgávan í framtíðini verður ein kommunal uppgáva burturav. Fyri at viga upp ímóti teimum meirútreiðslum, sum broytingin hevur við sær fyri kommunurnar er ætlanin, at lógin um býtið av almannaútreiðslum verður avtikin. Allar hesar lógir fáa gildi frá 1. januar ár 2000.

Eisini á eldraøkinum standa landsstýrið, løgtingið og ikki minst kommunurnar fyri stórum av-bjóðingum. Økið er afturúrsiglt. Í neyvum samstarvi við m.a. eldraráðið arbeiðir landsstýrið við at leggja eina langtíðarætlan fyri menning og útbygging á økinum. Landsstýrið miðar eftir, at bíðilistin til røktarheimspláss minkar, og eiga vit sum skjótast at seta skjøtul á at byggja í minsta lagi eitt røktarheim afturat í Føroyum.

Heilsutænastan verður støðugt bøtt, herundir ætlaða útbyggingini á Landssjúkrahúsinum, sum er við á verandi fíggjarlóg. Neyðugt verður at samskipa veitingarnar á sjúkrahúsøkinum, so vit fáa eina betri og meiri fjøltáttaða tænastu fyri játtanirnar á økinum.

Í ár er sett í gildi nýggj løgtingslóg um kommunulæknaskipan, og í næstum verður farið undir at viðgera spurningin um, hvussu vit menna og broyta kommunulæknaskipanina.

## Vinna

Á vinnuøkinum hevur landsstýrið júst orðað ein yvirskipaðan vinnupolitikk, har hugsjónin er ein sjálvberandi búskapur, ið byggir á ymiskar vinnur, sum skapa avkast, framburð og vælferð í fríari, altjóða kapping, og sum raðfesta trivnað og umhvørvið ovarlaga. Farið verður nú undir at orða politiska málið fyri einstøku vinnugreinarnar, herundir eisini innan kunningartøkni, lívfrøðitøkni og fíggjarvinnu.

Innan vinnuframa verða fleiri skipanir endurskoðaðar, sum kunnu vera vinnuni at frama. Ætlanin er at gera vinnuframaskipanirnar einfaldari, so fyritøkur og einstaklingar fáa lættari atgongd til tøka ráðgeving og tænastur.

Landsstýrið heldur eisini, at ein føroyskur partabrævamarknaður kann gerast ein týðandi táttur, tá nýtt virksemi skal setast á stovn, og verandi fyritøkur mennast.

Vinnumálastýrið legði fyrst í hesum árinum fram frágreiðing um, hvussu samferðslukervið í Føroyum sum heild skal skipast. Grundað á frágreiðingina var niðurstøðan, at arbeiðast skal

fram ímóti, at Vágoyggin og Norðuroyggjar fáa fast samband við meginøkið. Eisini skal nýtt skip bøta um sambandið við Suðuroynna. Landsstýrið ætlar at virka fyri at fremja hesar verkætlaninar, sum fara at bøta um umstøðurnar fyri økismenning. Tá verkætlanirnar eru framdar, verða umleið 85% av føroyingum knýttir í beinleiðis vegasambandið.

Uppskot til nýggja lóg fyri postvirksemi og Postverk Føroya verður lagt fram. Leisturin til lógaruppskotið fer at líkjast tí fyri fjarskiftisøkið. Eisini eru ætlanir um at fara undir at dagføra politikkin á ferðavinnuøkinum í ár.

Landsstýrið fer at taka viðurskiftini hjá landbúnaðinum til viðgerðar, serliga við atliti at fíggjarligu viðurskiftunum hjá festibóndunum.

**Fiskivinna**

Á fiskivinnuøkinum er farið undir at orða ein greiðan fiskivinnupolitikk. Til tess at røkka endamálinum í lógini um vinnuligan fiskiskap, skulu reguleringartiltøkini tryggja, at fiskastovnarnir undir Føroyum verða gagnnýttir burðardyggiliga við fiskidøgum, stongdum økjum og friðingum á gýtingarleiðum.

Fiskidagaskipanin er sum stýringaramboð endurskoðað. Hesum arbeiði hevur ein altjóða viðurkendur serfrøðingur í stovnsmetingum staðið fyri. Niðurstøðan er, at skipanin tænir sínum endamáli.

Landsstýrið fyrireikar uppskot at leggja fyri løgtingið til broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Broytingarnar hava til endamáls at gera reglurnar um ognarviðurskifti greiðari, at gera veiðirættindi umsetiligari, og annars sum heild at geva fiskivinnuni rúmari ræsur at arbeiða undir.

Fiskiveiðisamráðingarnar í 1999 hava gingið væl, hóast avtalurnar eru á nakað lægri stigi enn í 1998. Serstakliga eru botnfiskakvoturnar í Barentshavinum minkaðar. Útlendsk skip eru samsvarandi skerd á føroysku landleiðini.

Útlitini fyri uppsjóvarveiðuni eru tey somu sum í fjør, og við nýggjum skipum í føroyska veiðiflotanum verða kvoturnar betri gagnnýttar enn higartil.

Samanumtikið eru fiskiveiðimøguleikar okkara í íslendskum og grønlendskum sjógvi betri í 1999, enn teir vóru í 1998.

Nýggja vaktar- og bjargingarskipið, sum verður bygt á norskari skipasmiðju, verður liðugt næsta heyst.

Landsstýrið setti sær sum mál í fjør at yvirtaka skipaeftirlitið, og ein nevnd er síðan sett at gera uppskot um, hvussu hetta kann gerast.

**Uttanríkisviðurskifti**

Í uttanríkismálum verður nú farið undir samráðingar við íslendingar um markið millum Føroyar og Ísland, eftir at sáttmáli er undirskrivaður við bretar um markið millum Føroyar og Bretland. Samráðingarnar við íslendingar verða skipaðar á sama hátt sum við bretar. Tær byrja,

byrja, tá íslendingar eru til reiðar at samráðast.

Samráðingarnar við ES í fjør heyst vóru eitt stórt framstig fyri Føroyar og føroysku vinnuna. Broytingarnar í sáttmálanum høvdu við sær, at umleið 97% av ES handlinum nú er fríur. Landsstýrið fer at leggja stóran dent á at beina tær seinastu avmarkingarnar í sáttmálanum burtur.

Samráðingarnar um at víðka handilssáttmálan við ES til eisini at fevna um heilsufrøðilig viðurskifti, halda fram. Føroyar standa í dag á einum vegamóti í framtíðar samstarvinum við ES, og spurningurin er, hvørja leið vit skulu halda. Tvinnar møguligar leiðir tykjast at standa frammalaga. Tær eru ávikavist, at verandi handilssáttmáli verður víðkaður til ein EBS líknandi sáttmála, ella at Føroyar gerast sáttmálapartur í EFTA og EBS.

Í heyst verður løgd fyri tingið frágreiðing um hernaðarviðurskifti Føroya undir kalda krígnum. Frágreiðingin er eitt úrslit av arbeiðinum hjá nevndini, ið sambært løgtingssamtykt var sett at kanna hesi viðurskifti. Løgmaður hevur ætlanir um, at seta líknandi kanning í verk í eysturevropeisku londunum, fyri at lýsa Føroya støðu undir kalda krígnum frá hesi síðu.

## Kommunu- og útjaðaraviðurskifti

Ætlanin er at leggja fram eitt uppskot til nýggja kommunulóg í heyst. Lógin kemur í staðin fyri verandi kommunulóg, sum er frá 1972. Umframt at lógin verður dagførd, soleiðis at hon fer at samsvara við nútímans kommunala umsiting, eru eisini grundleggjandi broytingar í lógaruppskotinum.

Ætlanin er at økja kommunala sjálvstýrið, so kommunurnar fáa størri avgerðarrætt og eina meiri sjálvstøðuga ábyrgd av egnum málsøkjum.

Landsstýrið arbeiðir við ætlanum, hvørs endamál er at venda tí afturgongd, sum útjaðarin og serliga útoyggjarnar hava verið fyri, til framgongd. Ein nevnd verður í næstum sett at lýsa viðurskiftini hjá útoyggjunum. Ætlanin er, at nevndin m.a. skal gera eitt uppskot til ein útjaðarapolitikk.

## Oljuvinna

Í oljumálum er ferð sett á arbeiðið við at fyrireika útbjóðing av økjum til oljuleiting á føroyska landgrunninum.

Miðað verður ímóti í heyst at leggja fyri løgtingið uppskot til lóg um øki og treytir fyri fyrsta útbjóðingarumfar. Tíðarætlanin er knøpp, men við serkønari hjálp og arbeiðsbólkum, har starvsfólk úr øðrum aðalstýrum eru við, kunnu uppgávurnar verða loystar til ásetta tíð.

Útbjóðingarlógin tekur eisini støðu til, hvørjar møguleikar føroyskt vinnulív eigur at fáa, fyri at verða við í oljuvinnuni. Tá løgtingið hevur samtykt útbjóðingarlógina verður bjóðað út, og gongst sum ætlað, verða fyrstu leitingarloyvini latin næsta summar.

**Umhvørvi**
Umráðandi er at orða ein umhvørvispolitikk. Hetta er týdningarmikið, tá hugsað verður um at Føroyar eru ein fiskivinnutjóð, hvørs tilfeingið í stóran mun er treytað av einum reinum umhvørvi.

Arbeitt verður miðvíst við umhvørvinum í alivinnuni. Í samráð við alararnar og myndugleikarnar á staðnum eru nú øll aliøkini teknað upp av nýggjum. Hetta er ein liður í arbeiðinum at dagføra aliloyvini samsvarandi ali- og umhvørvispolitikk landsstýrisins.

Spurningurin um umhvørvi eigur at hava okkara ansni, nú vit í størri og størri mun gerast eitt ferðamannaland, eins og vit standa á gáttuni til eina møguliga oljuvinnu. Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk, ið skal gera eina heildarætlan fyri ein føroyskan umhvørvispolitikk.

**Útbúgving, gransking og mentan**
Á undirvísingarøkinum er útbúgvingarpolitikknevndin liðug við sítt arbeiði. Setningurin var m.a. at vísa á, hvussu vit fáa størri samvinnu millum útbúgving, gransking og vinnulív, og hvørjar útbúgvingar vit eiga at leggja dent á í framtíðini. Arbeiði nevndarinnar verður kunngjørt í september í ár saman við hinum álitunum í sjálvsstýrisverkætlanini.

Fleiri lógaruppskot, sum viðvíkja undirvísingarøkinum, verða løgd fyri tingið í hesi setuni. Ætlanin er at fremja broytingar í fólkaskúlalógini, at leggja fyri tingið uppskot um eftirskúla og eftirskúla fyri menningartarnað, og somuleiðis verður arbeitt við uppskotum um frískúlar og handarbeiðs- og listaútbúgving.

Roknast má við, at vit tey næstu árini mugu seta nógva orku av til menning av útbúgvingum við atliti at oljuvinnuna. Saman við nøkrum vinnuskúlum er stovnað "Oljuútbúgvingar-samtakið", sum hevur til endamáls at menna tær føroysku útbúgvingarnar og at útbúgva lærarar.

Umráðandi er somuleiðis at útbúgva fólk við førleika í kunningartøkni, so hetta bæði nøktar tørvin hjá vinnulívinum, og samstundis er ein hjálp hjá teimum ungu, ið fara undir víðari lestur.

Fyrireikingar verða gjørdar til at fara undir nýggjar almanna- og heilsuútbúgvingarnar, ið fevna um ávikavist heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Stórur tørvur er á at eftirútbúgva ella at skúla tey, ið starvast á hesum øki í dag.

Arbeiðsbólkar eru settir at endurskoða lógirnar um sjóvinnuútbúgvingarnar, og somuleiðis verður arbeitt við at gera nýggja lóg um fiskivinnuútbúgvingar.

Á mentanarøkinum verður arbeitt við at orða og leggja til rættis mentanarpolitisku verkætlanina fyri árini 2000 til 2005. Ætlanin er at leggja hesa ætlan fyri almenningin fyrst í næsta ári.

Ætlanin skal snúgva seg um tann leiklut, sum tað almenna skal hava, tá tað snýr seg um at stuðla skapan og útbreiðslu av mentan og list. Hon skal eisini fevna um ítróttin, ungdómsmentan og eina menningarætlan fyri bókasavnsverkið og siðsøguligu søvnini.

Spurningurin um útbúgving og útbúgvingarpolitikk og spurningurin um gransking og granskingarpolitikk eru nær knýttir at mentanarpolitikkinum. Tey næstu árini verða tilmælini frá útbúgvingarpolitikknevndini saman við menningarætlan Fróðskaparsetursins støðið undir okkara granskingarpolitikki.

*Harra formaður*

Tey tøk, sum vóru tikin í kreppuárunum, eiga øll, sum hava borið tungar byrðar, tøkk fyri. Og tey stórmál, sum eru loyst seinasta árið, eiga allir politiskir flokkar sín lut í.

Fyri framman liggja stór mál at loysa. Mín vón skal vera, at allir politiskir flokkar vilja fara undir hesa avgerandi tingsetu við opnum sinni og politiskum treysti at finna semjur.

Við dyggari undirtøku frá Føroya fólki er hetta fyritreytin fyri tí framburi, sum vit øll ynskja fyri Føroyar, og fólkinum sum her býr.

Sjónarringurin fyri framtíðina er víður. Ábyrgdin liggur á okkum at halda kós og skapa tryggleika.

Góða ólavsøku.

# PARTUR II

## Fyrisitingarmál

Á fyrisitingarøkinum heldur arbeiðið við nýggja starvsfólkapolitikkinum fram, og samstundis er farið undir at orða ein almennan fyrisitingarpolitikk.

### Fyrisitingarpolitikkur

Sum kunnugt eru stórar broytingar farnar fram í stýrisskipanarviðurskiftunum, og tað hevur m.a. havt við sær broytingar í fyrisitingarbygnaðinum. Hesar broytingar seta krøv til samskipan og samstarv í fyrisitingini.

Ein fyrisitingarpolitikkur er tí alneyðugur. Farið verður undir at orða leiðreglur fyri, hvussu almenna fyrisitingin skal virka og skipast, og hvussu politiski myndugleikin kann stýra og hava eftirlit við, at hon virkar, sum fyrisett.

Høvuðsendamálið er støðugt at betra førleikan hjá almennu fyrisitingini at loysa tær uppgávur, ið henni eru álagdar á besta hátt og soleiðis at tryggja, at borgarin fær sum mest burtur úr skattapeninginum á ein nøktandi hátt.

Endamálið er at styrkja heildarhugsanina í fyrisitingini og fremja felags fyrisitingarmentan og -siðalæru.

### Starvsfólkapolitikkur

Fyrisitingarpolitikkur setir krøv til starvsfólkini. Arbeiðið við at orða almenna starvsfólkapolitikkin heldur fram, samstundis sum fyrisitingarpolitikkurin verður orðaður. Tá ið fleiri partar av starvsfólkapolitikkinum eru settir í verk, verður farið undir at fyrireika arbeiðið við at hava umsjón við, hvussu starvsfólkapolitikkur verður framdur í verki, og á hvørjum stigi hann virkar, so tað á hesum grundarlagi støðugt ber til at menna starvsfólkapolitikkin.

## Uttanlandsmál

Viðvíkjandi uttanlandsmálum verður víst til frágreiðing løgmans um uttanlandsmál, ið varð til umrøðu á Føroya Løgtingi fyrst í árinum. Frágreiðingin lýsir sera gjølla tey mál, ið eru til viðgerðar á uttanríkispolitiska økinum, og sum hava týdning fyri Føroyar. Hon lýsir eisini tey øki, ið skjøtil er settur á viðvíkjandi framtíðar samstarvi millum Føroyar og onnur lond. Tí verða bert ávís mál, ið hava serstakan týdning, drigin fram í hesum sambandi.

### Marknamál

Drúgvu samráðingarnar seinastu árini um markið millum Føroyar og Bretland endaðu loksins, tá sáttmálin um markið millum londini varð undirskrivaður í Tinganesi í mai mánaði í ár.

Nú marknamálið við bretar er avgreitt, verður farið undir samráðingar við Ísland. Í samráð við danska uttanríkisráðharran verður farið fram eftir somu skipan og sama leisti, sum í samráðingunum við Bretland. Ein donsk/føroysk nevnd undir føroyskari leiðslu fer at standa fyri samráðingunum um markið millum Føroyar og Ísland. Farið verður undir hesar samráðingar, so skjótt íslendingar eru til reiðar at samráðast.

## Altjóða samstarv

### *Altjóða handilssamstarv*

Í heimshandlinum eru hendar stórar broytingar seinastu árini. Fjarstøða millum lond er ikki longur sama forðing fyri samskifti, og rákið í heimshandlinum gongur sum heild støðugt móti størri fríhandli.

Íblásturin til hesa gongd kemur frá alheimsfelagsskapum sum eitt nú heimshandilsfelagsskapinum World Trade Organisation (WTO), ið loysti GATT av í 1994. Sum partur av danska limaskapinum í WTO hava Føroyar bundið seg til at fylgja ásetingunum hjá WTO, og vit eru tí vorðin partur av hesum altjóða ráki. Landsstýrið ætlar, at Føroyar skulu verða meira virknar í WTO.

Tað hevur stóran týdning at hava í huga, at gongdin í ES lutvíst er ein partur av hesum altjóða ráki og teimum stevnumiðum, ið verða sett í WTO. Sum heild er føroyski búskapurin sera bundin at viðurskiftunum við umheimin, tí Føroyar hava ein sera stóran uttanlandshandil, ið svarar til eina slaka bruttotjóðarúrtøku.

Samstarv Føroya við ES er grundað á ein fiskivinnusáttmála og ein handilssáttmála. Fiskivinnusáttmálin er ein rammusáttmáli, har árligar semjur verða gjørdar um sínámillum fiskiskap. Víst verður til fiskivinnumál, har hesi viðurskifti eru umrødd.

### *Handilssáttmálin við ES*

Ein afturvendandi trupulleiki í viðurskiftunum við ES er, at Føroyar verða viðgjørdar eins og triðjalond. Vegleiðandi prísskipanin er til ampa fyri vinnuna og lýkur ikki galdandi WTO ásetingar, tá talan er um fríhandilssáttmálar. Fleiri lond hava víst á sama trupulleika, og tað hevur fingið rættiliga gongd á málið.

Samráðingarnar við ES í fjør heyst vóru eitt greitt framstig fyri Føroyar og føroysku vinnuna. Broytingarnar í sáttmálanum høvdu við sær, at umleið 97% av handlinum við ES nú er fríur. Hesar broytingarnar fáa gildi 1. august í ár.

Avmarkingar eru tó framvegis fyri tveir vørubólkar, ið hava handilsligan týdning. Tað eru pilkaðar rækjur og fiskafóður. Landsstýrið fer at leggja stóran dent á eisini at fáa tær seinastu avmarkingarnar burtur.

Við serligum atliti til alevropiska upprunaøkið hevur tað eisini stóran týdning, at Føroyar gera seg galdandi í framtíðar evropeiska handilssamskiftinum.

### *Heilsufrøðiligt samstarv við ES*

Farið er undir at víðka handilssáttmálan við ES til eisini at fevna um heilsufrøðilig viðurskifti.

Eitt heilsufrøðiligt frumskjal verður í næstum knýtt at sáttmálanum sum ein samanhangandi partur av honum.

Nærri samráðingar um eitt fylgiskjal til frumskjalið fara at fevna um ásetingar um matvørutrygd, heilsu og umhvørvi. Av tí at nærum allur útflutningur Føroya er fiskavørur, eru slíkir sáttmálar um dygdar- og reinføriskrøv sera gagnligir.

## Framtíðarstøða Føroya í Evropa

Føroyar standa í dag á einum vegamóti í framtíðar samstarvinum við ES, og spurningurin er, hvørja leið vit skulu halda. Tvær møguligar leiðir tykjast at standa frammalaga. Tær eru ávikavist, at verandi handilssáttmáli verður víðkaður til ein EBS líknandi sáttmála, ella at Føroyar gerast sáttmálapartur í EFTA og EBS. Leiðirnar eru ikki í andsøgn við hvørja aðra og kunnu gangast samstundis, til ein semja er gjørd við EFTA og EBS londini um ta seinnu leiðina.

Landsstýrið fer at halda fram við at menna og byggja út handilssáttmálan í samráðingum við ES-nevndina. Hetta verður ein áhaldandi samráðingartilgongd, ið fer at krevja drúgførar og truplar samráðingar næstu árini.

Danska stjórnin metir tað ikki vera møguligt, at Føroyar gerast sáttmálapartur í EFTA og EBS. Grundgevingarnar eru tvinnar. Onnur er, at tað stjórnarrættarliga ber ikki til, tí Føroyar í dag eru ein landslutur hjá Danmark, og tí EFTA bert telur sjálvstøðug lond. Hin grundgevingin er politisk og merkir, at Danmark fer at sita báðu megin borðið, sum er ein støða, ið onnur EBS lond væntandi ikki kunnu góðtaka.

### *Handilssáttmálar við onnur lond*

Stig eru tikin til at fáa í lag handilssáttmálar við londini í mið- og eysturevropa. Føroyar hava verið afturúr sigldar á hesum øki.

Fyrstu sáttmálarnir við Estland og Pólland eru komnir í gildi, og farið er undir samráðingar við Lettland og Litava. Virkað verður annars miðvíst fyri at fáa í lag sáttmálar við hini mið- og eysturevropeisku londini í ár.

Stig eru tikin til handilssáttmála við onnur lond í Evropa, eitt nú Russland, umframt onnur lond úti í heimi.

## Norðurlandamál

Norðurlendska samstarvið er í øllum lutum av stórum týdningi fyri Føroyar. Umframt ítøkiligar sáttmálar, avtalur, norðurlendskar stovnar og tiltøk, so er politiska luttøkan hjá tingmonnum, landsstýrismonnum og embætisfólki í norðurlendskum høpi eitt týdningarmikið politiskt og fakligt støði. Norðurlandasamstarvið eigur harumframt at vera eitt portur út í altjóða samfelagið.

Hetta er ikki av minni týdningi fyri einar sjálvstøðugar Føroyar, og landsstýrissamgongan hevur samtykt, at Føroyar skulu hava sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Landsstýrið hevur kannað, hvussu eigur at verða farið fram løgfrøðiliga, og hvørji krøv ein sjálvstøðugur limaskapur setir. Hetta verður partur av frágreiðingini um sjálvstýristilgondina.

Eisini kannar landsstýrið, hvussu vit kunnu gjalda okkara part til norðurlendska samstarvið – eisini áðrenn ein sjálvstøðugur limaskapur er góðkendur.

At samskipa føroysku luttøkuna í norðurlendskum samstarvi í størri mun, hevur verið viðgjørt javnan seinastu árini. Fyrst í hesi tingsetuni fer landsstýrið at skipa fyri einum fundi millum allar myndugleikar og stovnar, sum starvast við Norðurlandamálum (løgting, landsstýri og stovnar), um at samskipa arbeiðið. Í fyrstu atløgu verður miðað eftir eini felags kunningarskipan um dagliga arbeiðið og felags kunning mótvegis almenninginum um norðurlendskt virksemi, stuðulsmøguleikar o.s.fr. Eisini eigur samskipanin millum Tingmannaráð Útnorðurs og Norðurlandamál at styrkjast.

Í øðrum lagi verður møguleikin fyri at samskipa skrivstovuuppgávurnar viðgjørdur.

Norðurlandasamstarvið hevur, eftir at Finland og Svøríki fóru upp í ES, vent sær alt meiri mótvegis ES og mótvegis teimum sonevndu ”norðurlendsku nærøkjunum”, sum higartil eru lýst sum baltisku londini og Útnyrðingsrussland. Harvið hava Norðurlond eisini átikið sær at samstarva meira um politikkin mótvegis umheiminum. Landsstýrismaðurin í Norðurlandamálum hevur skotið upp fyri norðurlendsku samstarvsráðharrunum, at samstarvið við tey sonevndu ”nærøkini” verður víðkað til eisini at fevna um nærøkini í Norðuratlantshavi – Hetland, Orkneyoyggjar, Suðuroyggjar, Skotland, Írland og kanadisku økini og oyggjarnar vestanfyri.

Landsstýrið fer at leggja eina frágreiðing um Norðurlandamál fyri tingið í heyst, sum viðger hesar spurningar og leggur fram uppskot til ein greiðan norðurlandapolitikk. Høvuðsendamálini í norðurlandapolitikki landsstýrisins eru hesi:

- At samskipa føroysku luttøkuna í norðurlendskum samstarvi.
- At gera Føroyar sjónligari í norðurlendska samstarvinum og at fáa sjálvstøðugan limaskap.
- At styrkja um samstarvið í Útnorði og í Norðuratlantshavi.
- At smalka um gjónna millum skandinavisku londini og londini í Útnorði.
- At smalka um gjónna millum Norðurlond í ES og Norðurlond uttanfyri ES.
- At víðka norðurlendska samstarvið mótvegis umheiminum til grannalondini í Útnorði: Hetland Orkneyoyggjar, Suðuroyggjar, Skotland, Írland og kanadisku oyggjarnar og økini vestanfyri.
- At norðurlond í felag stuðla rættinum til at umsita og gagnnýta egið tilfeingi á sjógvi og landi.
- At norðurlond stuðla rættinum til at menna egið mál og mentan og stuðla amboðum at menna tey smáu málini í Norðurlondum.
- At norðurlond stuðla gransking og útbúgving tvørturum landamørk.

# Kommunumál

Landsstýrið hevur í sambandi við kommunumál sett sær fleiri politiskar málsetningar. Arbeiðið við at røkka hesum málsetningum er byrjað og fer at halda fram. Landsstýrið hevur sett sær fyri:

- at loysa fíggjarligu trupulleikarnir hjá teimum mest skuldarbundnu kommununum,
- at nútímansgera kommunulóggávuna, og
- at styrkja kommunala sjálvræðið og kommunalu ábyrgdina.

## Fíggjarviðurskifti

***Skattainntøkur***

Skattainntøkurnar hjá kommununum eru vaksnar nógv seinastu árini. Í 1995 vóru tær 660 mió. kr., meðan tær í 1998 vóru 780 mió. kr.

Í fíggjarætlanunum hjá kommununum fyri 1999 verður roknað við eini skattainntøku upp á uml. 780 mió. kr., men ein framskriving av skattainntøkunum higartil í ár gevur yvir 800 mió. kr. fyri árið. Meðal kommunuskattaprosentið er eisini fallandi, og er tað nú komið niður á 19,12%.

***Kommunuskuldin***

Kommunurnar hava seinastu árini sett alsamt meir av til avdráttir, so hvørt sum rentuútreiðslurnar eru lækkaðar. Í 1996 vóru bert 60 mió. kr. nýttar til niðurgjalding av skuld, meðan talið fyri 1999 er sett til 136 mió. kr. Rentuútreiðslurnar eru hinvegin mettar at lækka við 20 mió. kr. niður í 89 mió. kr. Orsøkin er lága rentustigið og niðurgjaldingin av skuldini.

Kommunuskuldin verður við árslok umleið 1,4 mia. kr., ið samsvarar við umleið 1,75 álíkningar. Í 1995 samsvaraði skuldin við umleið 3 álíkningar. Minkingin í skuldini skyldast bæði stórari niðurgjalding av skuldini og øking í skattainntøkunum. Skuldin er tó enn sera tyngjandi fyri raksturin hjá flestu kommunum, tí umleið ein fjórðingur av kommunalu fíggjarætlanunum fer til lánsgjøld. Landsstýrið metir, at tað er umráðandi, at ein varandi loysn kann fáast á spurninginum um kommunuskuldina.

Landsstýrið og umboð fyri kommunurnar eru samd um, at er skuldarbyrðan hjá eini kommunu við 23% í kommunuskatti størri enn 3 álíkningar, hevur kommunan trupulleikar við at klára sínar uppgávur og skyldur. Nakrar kommunur eru í hesi truplu støðu.

Harafturat eru nakrar kommunur, sum hava eina skuld, ið er júst undir 3 álíkningar, men har lánini eru sett soleiðis saman, at mett verður, at hesar eisini eiga at vera við í eini loysn, so eisini tær kunnu fáa fíggjarligt fótafestið aftur.

Fyri at loysa skuldarspurningin hjá hesum kommunum, er ætlanin at nýta pening úr kommunala láni- og veðhaldsgrunninum til at afturgjalda skuld.

Løgtingið hevur játtað 25 mió. kr. í studningi til kommunala láni- og veðhaldsgrunnin, so hann kann lúka treytirnar í lániavtaluni um, at hann skal hava 100 mió. kr. í innskoti, eisini eftir at saneringin er framd.

Lániavtalan, sum er gjørd millum kommunurnar og teirra lánveitarar, fer úr gildi tann 1. desember 2000. Í góðari tíð er ætlanin at fáa greiðu á, um grunnurin skal halda fram eftir 1. desember 2000, og tá kann hvør einstøk kommuna gera av, um hon vil vera við í eini felags

fígging ella ikki. Landsstýrið er sinnað at gera sítt til, at ein felags endurfígging fæst av kommunalu skuldini, tá verandi lániavtala fer úr gildi.

## Kommunulógin

Landsstýrið hevur ætlanir um at leggja fram eitt uppskot til nýggja kommunulóg í heyst. Nýggja lógin fer í stóran mun at byggja á tað arbeiðið, sum Kommununevndin hevur gjørt. Lógin skal avloysa verandi kommunulóg, sum er frá 1972.

Umframt at lógin verður dagførd, soleiðis at hon fer at samsvara við nútímans kommunala umsiting, verða eisini grundleggjandi broytingar í lógaruppskotinum. Ætlanin er at økja kommunala sjálvstýrið, so kommunurnar fáa størri avgerðarrætt og eina meiri sjálvstøðuga ábyrgd av egnum málsøkjum.

## Framtíðar kommunubygnaður

Landsstýrið fekk í september 1998 handað eitt álit frá Kommununevndini, hvørs høvuðsendamál var at gera eitt uppskot til eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Í verandi skipan er uppgávu- og ábyrgdarbýtið í fleiri førum sera ógreitt. Í dag krevst játtan frá hægri myndugleika, áðrenn nógvar kommunalar avgerðir kunnu setast í verk. Uppgávur, sum áttu at verið kommunalar, verða loystar heilt ella fyri ein part av landinum, og hevur hetta við sær, at tann veruligi avgerðarrætturin ikki liggur hjá kommununum. Ein av orsøkunum er, at kommunurnar bert partvís fíggja tær útreiðslur, sum hesar avgerðir hava við sær.

Í áliti sínum skjýtur Kommununevndin upp, at meginreglan í nýggju kommunalu skipanini skal vera, at tann, sum hevur avgerðarrættin, eisini skal bera ta fíggjarligu ábyrgdina. Tær uppgávur, sum verða kommunalar, skulu verða fult og heilt kommunalar. Kommunurnar skulu innan fyri lógarkarmarnar hava fullan avgerðarmyndugleika, men eisini bera fulla fíggjarliga ábyrgd av uppgávunum.

Landsstýrið tekur undir við hesum tilmæli hjá Kommununevndini. Landsstýrið fer tí sum skjótast at byrja arbeiðið við at fáa hesi viðurskifti nærri útgreinað, og er ætlanin at seta arbeiðsbólkar at útgreina viðurskiftini fyri hvørt øki sær, so uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur í komandi tíðum verður munandi greiðari.

Kommununevndin mælir í áliti sínum til, at tað skal vera eitt krav, at kommunurnar sjálvstøðugt skulu kunna umsita tær kommunalu uppgávunar. Tí eiga uppgávur ikki at verða latnar kommununum at fyrisita, fyrr enn tær eru umsitingarliga búnar til tess. Í hesum sambandi heldur kommununevndin, at kommunusamanlegging er ein fyritreyt fyri, at uppgávur kunnu verða latnar kommununum at umsita.

Landsstýrið er lutvíst samt við Kommununevndini í hesum spurningi og metir eisini, at kommunurnar fyrisitingarliga eiga at verða førar fyri at átaka sær tær uppgávur, sum teimum verða latnar. Hinvegin er landsstýrið ikki samt við Kommununevndini í, at tvungin kommunusamanlegging skal vera ein treyt fyri, at uppgávur kunnu latast kommununum at umsita.

Landsstýrið heldur framvegis, at kommunurnar eiga at leggja saman sjálvbodnar. Landsstýrið metir, at verður uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skipað á ein skynsaman hátt, fara kommunurnar sjálvar at finna fram til best hóskandi loysnina, so umsitingin av teimum uppgávum, sum verða kommunalar, fer fram á ein góðan og forsvarligan hátt.

# Sjálvstýrismál

Hendan komandi tingsetan verður tíðarskeiðið, har politiskir málsetningar og fyrireikingar til fult føroyskt sjálvstýri skulu setast í verk og standa sína roynd. Lyklaorðini hjá landsstýrinum í sjálvstýristilgondini eru neyv fyrireiking, demokratisk viðgerð og upplýsing. Endamálið er, at størst møgulig politisk semja fæst, og at allir borgarar kenna seg tryggan og hava eitt gott grundarlag fyri at taka støðu á komandi fólkaatkvøðum.

Sjálvstýrismál hava verið skipað, sum sjálvstøðugt málsøki í landsstýrinum nú í eitt gott ár. Arbeiðið verður gjørt, sum ein verkætlan, har bæði fólk innan landsfyrisitingina og fólk uttanífrá røkja uppgávurnar. Hetta gevur møguleika fyri eini bíligari og liðiligari skipan, har atlit verða tikin til øll málsøki, samstundis sum serfrøði uttanífrá verður drigin inn í fyrisitingina. Arbeiðið verður samskipað á Løgmansskrivstovuni, har eitt fólk er sett í starv burturav til sjálvstýrismál.

Ætlanin hjá landsstýrinum hevur verið skipað í fýra høvuðsstigum. Farið verður í hesi tingsetuni undir triðja stigið, har formligu viðurskiftini skulu greiðast í samráðingum við donsku stjórnina. Gongdin hevur verið hendan:

## 1. stig: Politiski málsetningurin

Í avtaluni frá 10. juni 1998 millum landsstýrið og donsku stjórnina varð staðfest, at danska stjórnin er tilreiðar at samráðast við landsstýrið um framtíðarviðurskiftini landanna millum eftir ynski landsstýrisins. Hartil er stjórnin til reiðar at samráðast um eina varliga búskaparaliga tillaging til tess, at føroyski búskapurin gerst sjálvberandi.

Landsstýrið valdi at leggja eitt uppskot fyri tingið til samtyktar í august 1998. Uppskotið greiddi frá ætlanum landsstýrisins og bað tingið um heimild at fara undir allar neyðugar fyrireikingar og at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um ein nýggjan sáttmála millum londini. Sáttmálin skal skipa Føroyar sum eitt land við fullveldi og áseta framtíðarsamstarvið við Danmark á javnbjóðis føti - millum tvey sjálvstøðug lond. Sáttmálin skal góðkennast bæði á fólkatingi og á løgtingi, áðrenn hann kann leggjast til fólkaatkvøðu í Føroyum til endaliga avgerð.

Endamálið við uppskotinum á tingi var frá fyrsta stigi at viðgera sjálvstýrisspurningin á tingi og í almenninginum, og at royna at finna eina breiða semju á tingi um politisku høvuðsmálini. Uppskotið varð samtykt 2. oktober 1998, og Løgtingið skoytti upp í uppskotið, at innan farið verður til samráðingar við donsku stjórnina, skal landsstýrið leggja eina frágreiðing um allar fyrireikingar fyri tingið til aðalorðaskiftis.

Landsstýrið legði síðani lógaruppskot fyri tingið um at seta grundlógarnevnd at gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar, og hetta varð samtykt 5. februar 1999. Grundlógarnevndin, sum hevur umboð frá øllum flokkum á tingi, er farin til verka og fer í hesi tingsetuni at hava almennar hoyringar um arbeiðið.

Sostatt varð politiski framferðarhátturin lagdur í trygga legu, og annað stig í ætlanini kundi setast í verk.

## 2. stig: Kanningar, útgreiningar og fyrireikingar

Landsstýrið setti síðani nevndir og bólkar at gera neyðugar kanningar og fyrireikingar:

- Sáttmálanevndin lýsir tey ríkisrættarligu viðurskiftini, og hvussu farast kann fram, tá føroyskt fullveldi skal staðfestast í einum sáttmála. Nevndin lýsir eisini aðrar skipanir, sum liggja ímillum heimastýri og fullveldi.
- Búskaparnevndin lýsir týdningin av blokkstuðlinum og lýsir, hvat krevst í okkara egnu framleiðslu fyri at viga upp fyri einum minkandi blokkstuðli. Hartil vísir nevndin á búskaparpolitisk amboð, sum eru neyðug í einum sjálvstøðugum føroyskum búskapi.
- Tey einstøku stýrini í landsumsitingini lýsa hvønn týdning, samstarvið við Danmark hevur og krøvini til sjálvstøðuga føroyska lóggávu, fígging, skiftiskipanir og samstarv á teimum økjum, sum danir umsita í dag.

Arbeiðið hevur gingið væl og eitt stórt tal av fólki hevur lagt stóra orku í at fáa frágreiðingarnar lidnar. Úrslitini verða savnað í ”Hvítubók”, sum verður almannakunngjørd 1. september 1999.

Uttanlandsnevnd Løgtingsins hevur verið kunnað um alt arbeiðið við Hvítubók, og hon verður framhaldandi kunnað regluliga. Landsstýrið fer at skipa fyri kunningarfundum fyri øllum tinglimum um Hvítubók, har nevndirnar kunnu greiða frá arbeiðinum og svara spurningum. Somuleiðis verður skipað fyri kunning til fjølmiðlar og almenning. Við hesum vónar landsstýrið, at eitt gott støði verður lagt fyri aðalorðaskiftinum á tingi um Hvítubók og komandi samráðingarnar.

Miðað verður eftir at hava aðalorðaskiftið í seinnu helvt av september mánaða.

Útgreiningararbeiðið í Hvítubók lýsir møguleikar og krøv til einar sjálvstøðugar Føroyar. Hvítabók eigur tí at skiljast og brúkast sum ein politiskur amboðskassi. Landsstýrið fer at gera politiskar niðurstøður og neyvar ætlanir fyri, hvussu amboðini skulu nýtast, og hvussu byggiætlanin fyri einar sjálvbjargnar Føroyar verður sett í verk.

## 3. stig: Samráðingar

Í hesi tingsetuni verður farið undir tað týdningarmikla samráðingarstigið. Eftir aðalorðaskiftið á tingi um Hvítubók er greitt at leggja endaligu samráðingarnar við donsku stjórnina til rættis.

Skipað verða samráðingarnevnd og undirbólkar, so tey yvirskipaðu ríkisrættarligu viðurskiftini, búskaparviðurskiftini og tey einstøku málsøkini eru væl umboðað og fyrireikað til samráðingarnar.

Landsstýrið hevur kunnað stjórnina um, at samráðingar kunnu byrja seinni í heyst. Hvar samráðingarnar verða, og hvussu tær skulu fara fram, verður avtalað nærri við donsku stjórnina.

Landsstýrið miðar eftir einum neyvum samstarvi og samskifti við Uttanlandsnevnd Løgtingsins í samráðingargongdini.

### 4. stig: Demokratisk avgerð

Tá semja er fingin um ein sáttmála millum stjórnina og landsstýrið, skulu ávikavist fólkatingið og løgtingið góðkenna sáttmálan. Tá hann er góðkendur, skal hann leggjast til fólkaatkvøðu í Føroyum, og fær hann meiriluta, kann hann setast í gildi.

Sami framferðarháttur er galdandi fyri uppskotið til føroyska grundlóg. Grundlógarnevndin skal sambært lógini lata álit og uppskot til føroyska grundlóg úr hondum innan 1. juni ár 2000. Uppskot verður síðani lagt fyri Løgtingið um grundlóg og herundir ásetingum fyri fólkaatkvøðu og gildiskomureglum.

Landsstýrið miðar framvegis eftir, at ein sáttmáli kann leggjast til fólkaatkvøðu í komandi ári, og at grundlógaruppskot kann leggjast til fólkaatkvøðu sama ár.

Mett verður, at neyðugt er at fáa formligu viðurskiftini í trygga legu.

### Føroysk rættarskipan

Arbeiðið at gera uppskot um eina føroyska rættarskipan kann gerast drúgført, tí er enn ov tíðliga at siga, nær tað kann verða liðugt.

Um føroyskt fullveldi verður stovnað, áðrenn uppskotið um føroyska rættarskipan er liðugt, so er greitt, at hildið verður fram eftir teim galdandi rættarreglunum í eini skiftistíð, einans tillagað til nýstovnaða fullveldið.

## Løgmál

Stórar avbjóðingar standa fyri framman í løgmálum. Løgmál hava higartil í stóran mun snúð seg um tekniska eftirkanning av lógaruppskotum og viðgerð av ríkislógartilmælum. Løgmansskrivstovan umsitur hartil yvirskipaða lóggávu eitt nú stýrisskipanarlógina, fyrisitingarlógina, lógina um alment innlit, skrásetingarlóg o.a.

Í framtíðini skal leggjast størri dentur á samskipandi uppgávur viðvíkjandi lógarsmíði, fyrisiting og rættartrygd.

Ætlanir landsstýrisins fyri sjálvstøðugari fyrisiting av øllum málsøkjum í Føroyum seta krøv til nýggja lóggávu og nýggjar uppgávur hjá fyrisiting og umsiting. Broytingarnar í miðfyrisitingini hava spjatt lóggávuarbeiðið á fleiri serøki, og tí er neyðugt við greiðari samskipan av lóggávu- og fyrisitingarsiðvenju.

Málsetningurin hjá landsstýrinum í løgmálum er hesin:

- at styrkja rættartrygdina hjá borgaranum.
- at menna upplýsing og almenna innlitið í fyrisitingina.
- at hava greiðar endamálsorðingar í allari lóggávu.
- at skapa einfalda og gjøgnumskygda lóggávu.
- at fáa føroyska lóggávu á øllum økjum, ið er lagað til tørv og fortreytir.
- at føroyska lóggávan skal vera í samsvari við altjóða avtalur og reglur.

Eitt stórt stig á leiðini er arbeiðið við Lógbókini fyri Føroyar, har eykabind og leitibind eru givin út í ár. Sostatt er øll galdandi lóggáva í Føroyum dagførd. Næsta stigið við lógardatabasa verður liðugt um ein góðan mánað. Løgmansskrivstovan hevur fyrireikað seg til at røkja og dagføra hetta týdningarmikla amboðið fyri føroyska lóggávu og rættartrygd.

## Lógarforum

Til tess at røkka málsetningunum er tó tørvur á, at sjálv lóggávu- og fyrsitingarsiðvenjan verður endurskoðað. Størri dentur skal leggjast á sambandið millum lóggávusmíð og krøvini til umsiting og rættartrygd. Nevnast kann, at grundlógarnevndin í sínum arbeiðssetningi eisini viðger spurningin um lóggávusiðvenju og umsiting.

Fyri at fáa gongd á samskipandi uppgávurnar fer Løgmansskrivstovna at skipa fyri einum sonevndum lógarforum, ið regluliga skal viðgera høvuðsspurningar um lóggávu, fyrisiting og rættartrygd. Løgfrøðingar úr almennu fyrisitingini, av løgtingsskrivstovuni og privatir løgfrøðingar verða bodnir í felag at viðgera hesar spurningar:

- *Lóggávusiðvenja:* Einfald og gjøgnumskygd lóggáva heldur enn smálutalóggáva - krøv til fyrisiting og umsiting
- *Lóggávufyrireiking*: Sambandið millum politiskar málsetningar og lóggávusmíð - málsetningar, hoyringar, grundgevingar og viðmerkingar
- *Samskipan og samstarv í einum lítlum samfelag*: Hvussu brúka vit løgfrøðiliga kunnleikan best? – samstarv millum alment og privat í lóggávuarbeiðinum í framtíðini
- *Alment innlit og rættartrygd*: Upplýsingarskylda

Løgforumið kann somuleiðis viðgera, hvussu samstarv kann fáast í lag um at gera føroyska lóggávu á teimum økjum, sum eru donsk málsøki í dag.

## Onnur løgmál

Seinasta árið hevur Løgmansskrivstovan eisini fingið nýggjar uppgávur at røkja.

Útlendingalóggávan er enn danskt málsøki, men landsstýrið bað í fjør um at fáa hoyringsrætt viðvíkjandi uppihaldsloyvum. Hetta er samstundis ein góð fyrireiking til sjálvstøðuga føroyska fyrisiting og lóggávu á økinum.

Løgmansskrivstovan samstarvar somuleiðis við danskar myndugleikar um, hvussu sonevnda "Schengen-avtalan" kann umsitast í Føroyum. Við Schengen-avtaluni verður norðurlendska passfrælsið varðveitt, og føroyingar fáa frítt at fara í øllum Evropa. Afturfyri skal innanlendis eftirlitið styrkjast, og verða neyðug uppskot hesum viðvíkjandi løgd fyri tingið.

Familjurættarliga lóggávan er framvegis afturúrsigld. Fyrsta stigið at dagføra hana kom við broytingunum í hjúnarbandslógini í fjør, og nú verður arbeitt fyri at fáa myndugleikalóggávu o.a. fyri tingið. Hetta er framvegis donsk lóggáva, men í arbeiðinum við broytingum verða tikin atlit til norðurlendskar reglur og til sjálvstøðuga føroyska fyrisiting og lóggávu á økinum.

Í hesi tingsetuni er ætlanin at leggja uppskot um at endurskoða navnalóggávuna fyri tingið. Nevnd er sett at eftirhyggja lóggávuna út frá royndunum, síðani hon kom í gildi í 1992. Lógin skal eftirhyggjast tekniskt og málsliga, og við atliti at teimum royndum, ið eru gjørdar, síðani lógin kom í gildi, skal nevndin koma við uppskoti um, hvørjar broytingar eiga at verða gjørdar í lógini. Nevndin skal m.a. umhugsa, um reglurnar í lógini um fornøvn eiga at verða broyttar soleiðis, at avgerð um góðkenning av fornøvnum í størri mun enn eftir galdandi lóg kann grundast á siðvenjur, sum hava vunnið hevd yvir fleiri ættarlið.

Nevnd verður eisini sett at endurskoða skrásetingarlóggávuna við atliti til kollveltingina innan teldu- og internet-tøkni og við atliti til leiklutin hjá skrásetingareftirlitinum í framtíðini.

Eydnuspæls- og veddingarlóggávan verður eisini endurskoðað við atliti til nýggju møguleikarnar fyri internetútbjóðing og við atliti til, hvussu meginreglan um vedding fyri almannagagnlig endamál kann fasthaldast.

# Fíggjar- og búskaparmál

Føroyski búskapurin hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini. Hetta er at fegnast um, men búskaparvøkstur hevur trúgvar óynsktar fylgisneytar. Teir eru prísvøkstur, lønarvøkstur og versnandi handils- og gjaldsjavni, sum stendst av økta vøruinnflutninginum, ið økt nýtsla og eftirspurningur hevur við sær.

Tí er av stórum týdningi at fylgja sera væl við einum so stórum búskaparligum vøkstri, sum vit hava havt seinastu árini.

**Búskapargongdin**
***Fólkatalið***
Fólkatalið veksur alsamt, og mett verður, at 370 fólk koma afturat í ár, so fólkatalið við árslok 1999 verður 45.187. Vøksturin stavar helvt um helvt frá nettoinnflytingini og burðaravlopinum.

***Arbeiðsloysi***
Arbeiðsloysið er minkandi og er nú komið niður á 6 % móti 8 % somu tíð í fjør. Tá eru tey, sum bert fáa stuðul frá Almannastovuni, eisini tald við.

***Lønarútgjaldingar***
Lønarútgjaldingarnar vóru fyrstu fimm mánaðirnar í ár 118 mió. kr. hægri enn sama tíðarskeið í fjør, og er hetta ein vøkstur uppá 7 %. Vøksturin somu tíð í 1998 var 10 % í mun til 1997. Annars var árligi vøksturin 8 % bæði frá 1996 til 1997 og frá 1995 til 1996.

Verður hugt nærri at tølunum sæst, at vøksturin í lønarútgjaldingunum í fiskivinnuni er steðgaður ella rættari minkaður við 1 %, meðan vøksturin í alivinnuni og fiskaídnaðinum annars framvegis er stórur ávikavist 27 og 20 %. Lønarútgjaldingarnar í byggivirksemi eru vaksnar við 23 %.

Í 1999 fara lønarútgaldingarnar væntandi fyrstu ferð aftur nominelt upp um lønarútgjaldingarnar í 1990.

***Innflutningur***

Fyribilstølini vísa, at innflutningurin vaks frá 1996 til 1997 við 10%, og aftur við 10 % frá 1997 til 1998.

Innflutningurin fyrstu 5 mánaðirnar í 1999 var 20% størri enn somu tíð í fjør, tá skip og fiskur ikki eru tald við. Tann største vøksturin er í innflutningi til vinnuna, innflutningi av bilum og innflutningi til beinleiðis nýtslu. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu er fyrstu fimm mánaðirnar í 1999 9% hægri enn somu tíð í fjør, meðan vøksturin í 1998 var 11 %, í 1997 12% og í 1996 9 %.

Sammeta vit gongdina í lønarúrgjaldingunum við vøksturin í innflutninginum til beinleiðis nýtslu, so vuksu lønarútgjaldingarnar frá 1996 til 1997 við 8 %, meðan innflutningurin til beinleiðis nýtslu vaks við 11 %. Frá 1997 til 1998 vuksu lønarútgjaldingarnar við 10 % og innflutningurin til nýtslu við 11 %, og fyrstu fimm mánaðirnar í 1999 vuksu lønarútgjaldingarnar við 7 % og innflutningurin til nýtslu við 9%. Út frá hesum sær út til, at vøksturin í innflutninginum til beinleiðis nýtslu er rættuliga stórur, og heldur seg nærhendis vøkstrinum í lønargjaldingum. Stóri vøksturin í samlaða innflutninginum er órógvandi, tí hann minkar um handilsíkastið til gjaldsjavnaavlopið.

***Útflutningur***

Útflutningurin uttan skip vaks fyrstu 5 mánaðirnar í 1999 við 110 mió. kr. ella 10 % í mun til somu tíð í 1998.

Stór minking er bæði í virði og nøgd, tá talan er um ísaðan og frystan fisk. Hinvegin er útflutningurin av ísaðum og frystum flaki, sum er tann størsti vørubólkurin, umleið tað sama í virði, hóast nøgdin er minkað nakað. Útflutningurin av saltfiski er vaksin bæði í nøgd og virði.

Vøksturin í útflutninginum av laksi vigar rættiliga upp ímóti minkingini í útflutninginum av ísaðum og frystum fiski. Fyrstu 5 mánaðirnar í 1999 er útflutningsvirðið á laksi og sílum vaksið við 106 mió kr. ella 77% samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Samanumtikið kann sigast um útlitini fyri útflutningin í 1999, at virðið av samlaða útflutninginum helst veksur, hóast vøksturin ikki verður stórur.

***Handilsjavnin***

Úrslitið á handilsjavnanum, íroknað skip, fyrstu 5 mánaðirnar í 1999 er 180 mió. kr., sum er umleið tað sama sum sama tíðarskeið í 1998. Avlopið á handilsjavnanum í 1997 var 202 mió. kr. og í 1998 317 mió. kr. Henda ikki stórvegis broytingar í búskapinum í 1999, skuldi handilsjavnayvirskotið ikki verið minni enn í 1998.

Við so stórum vøkstri í innflutninginum slepst ikki undan, at hart trýst verður á handilsjavnan og síðan á gjaldsjavnan.

Vanliga verður mesti dentur lagdur á gongdina í innflutning til beinleiðis nýtslu. Innflutningurin til vinnuna, bæði til rakstur og íløgur, veksur nógv, og neyðugt er eisini at fylgja við hesi gongdini, tí vøksturin kann vera tekin um eitt nú ov stórar íløgur.

***Landskassin***

Eingin ivi er um, at nógv ferð er á búskapinum í løtuni. Í fyrsta umfari gevur vøksturin í búskapinum eina størri inntøku til landskassan. Í 1998 var yvirskotið á fíggjarlógini 471 mió. kr., og í løtuni verður mett, at yvirskotið á fíggjarlógini í 1999 verður omanfyri eina hálva milliard. Broytist støðan ikki stórvegis í komandi ári, kann aftur roknast við einum avlopi uppá eina hálva milliard. Avdráttir av lánum eru tó ikki við í hesum tølunum.

## Búskaparpolitikkur

Mett verður, at tað hevur verið heldur nógv ferð á búskapinum seinastu tíðina, sum støðan er, verður ikki mett ráðiligt at slaka í búskaparpolitikkinum, ella at tað almenna yvirhøvur stimbrar samlaða eftirspurningin – heldur tvørturímóti.

Tølini fyri teir fyrstu 5 mánaðirnar í 1999 benda á, at vøksturin í útgoldnum lønum og innflutningi av nýtsluvørum er minkaður, og tølini fyri fyrsta ársfjórðing 1999 benda ikki á, at nakar trupuleiki enn er við gjaldsjavnanum.

Gjaldsjavnin fyri 1998 er ikki endaliga uppgjørdur enn, men avlopið verður aftur í 1998 mett at vera um eina milliard. Við tí stóra vøkstrinum, sum hevur verið í eftirspurninginum og innflutninginum, slepst ikki undan, at tað fyrr ella seinri verður eitt trýst á gjaldsjavnan.

Fyri landsbúskapin sum heild merkir hetta, at sjálvt um stígur er komin í tann góða fiskiskapin og fiskaprísirnar, so kann heimasektorurin við tí gjaldføri, sum er í samfelagnum í dag, í eina tíð afturat vaksa víðari skjótari, enn ynskiligt er.

Í samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær fyri at arbeiða fyri skatta- og avgjaldslækkingum, og landsstýrið fer tí ikki at tálma búskaparliga virkseminum við skatta- og avgjaldshækkingum. Heldur eigur at haldast aftur á útreiðslu- og íløgusíðuni á fíggjarlógini. Við eini lønarhækking uppá góð 6 %, hækkingum í lógarbundnu útreiðslunum, og ætlanum um at hækka fólkapensjónina, ber neyvan til at minka úreiðslukarmarnar á fíggjarlógini fyri ár 2000. Men sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyrr hevur boðað frá, verður fylgt við gongdini í búskapinum, og gerst tað neyðugt at seta tiltøk í verk fyri at halda aftur í búskapinum, so verður tað gjørt.

Í sambandi við at málsetningurin er at fáa blokkstuðulin burtur, hevur nógv verið tosað um at minka útreiðslurnar á fíggjarlógini. Hetta er eisini kjarnin í tí arbeiði, sum Fíggjarmálastýrið hevur tikið stig til saman við einstøku aðalstýrunum, við at endurskoða fyrisitingarliga lógarverkið. Málið er, at umsitingin á øllum málsøkjum verður einfaldari og lagað til tørvin í føroyska samfelagnum. Hetta arbeiðið er tó ikki løtuverk, men landsstýrið heldur, at tað er alneyðugt at hetta verður gjørt, og tað krevur, at vit standa saman í hesum arbeiði.

Málið er, at avlopið á fíggjarlógini kemur í eina tryggja legu og verður so stórt, at tað kann avloysa blokkstuðulin. Tað kann bert gerast, um vit av øllum alvi royna at ansa eftir og at halda aftur í útreiðslunum, nú búskaparvøksturin gevur størri inntøkur.

**Lóggáva**
Á lógarøkinum hevur Fíggjarmálastýrið fingið arbeiðið við kolvetnisskattalóggávuni frá hondini.

Av størri lógararbeiði, ið stendur fyri hjá Fíggjarmálastýrinum, kann nevnast kolvetnisskatta-fyrisitingarlógin. Á skatta- og avgjaldsøkinum verður talan um at fremja dagføringar, og verða broytingar gjørdar í pensjónsviðurskiftunum, hevur hetta eisini við sær broytingar í skattalógini.

Eisini verður arbeitt við at dagføra arvaavgjaldslógina, sum er gomul og ótíðarhóskandi. Arvaavgjaldið verður lutað millum danska ríkiskassan og landkassan, og ætlanin er, at ein størri partur skal fella til landskassan. Eisini er ætlanin at broyta avgjaldið, so tey nærmastu ikki rinda so nógv, men tó er ikki ætlanin at hækka arvaavgjaldið sum heild.

Arbeitt verður eisini við spurninginum um skatting av partabrøvum og øðrum virðisbrøvum. Lóggávan treingir til ábøtur, serstakliga nú arbeitt verður við at seta á stovn ein virðisbrævamarknað. Herumframt verður arbeitt við at dagføra donsku lógirnar á banka- og sparikassaøkinum og at seta í gildi lógir á virðisbrævamarknaðøkinum.

# Fiskivinnumál

Rikin verður ein varin fiskivinnupolitikkur, og farið er undir at orða ein greiðan fiskivinnupolitikk.

Til tess at røkka endamálinum í lógini um vinnuligan fiskiskap, skulu reguleringartiltøkini tryggja, at fiskastovnarnir undir Føroyum verða gagnnýttir burðardygt við fiskidøgum, stongdum økjum og friðingum á gýtingarleiðum.

Fiskidagaskipanin er sum stýringaramboð endurskoðað aftur í ár. Hesum arbeiði hevur ein altjóða viðurkendur serfrøðingur innan stovnsmetingar staðið fyri, og niðurstøðan er, at skipanin tænir sínum endamáli.

Dentur verður lagdur á samstarvið millum veiðilið, framleiðslulið og sølulið, økismenning, arbeiðsumhvørvi, góðskukrøv og hagreiðingarskipanir. Framhaldandi verður neyðugt at skapa fortreytir fyri at gera fiskirættindi meira umsetilig og at skapa rúmari ræsur í veiðiliðinum.

Fiskiveiðiavtalurnar við onnur lond fyri 1999 geva nakað minni av botnfiski, samstundis sum útlendsk veiðirættindi á føroysku landleiðini eru skerd. Størsta niðurgongdin í botnfiskakvotunum stavar frá niðurskurðinum í Barentshavinum. Fiskimøguleikarnir eftir upp-

uppsjóvarfiskasløgum eru eins góðir og í fjør, og sum heild eru veiðimøguleikar føroyinga víðkaðir á fjarleiðum.

Skipanin, ið skal forða fyri, at ov nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, hevur virkað væl. Allur fiskur, sum fer óvirkaður av landinum, skal hava verið alment boðin út í Føroyum. Hetta hevur bøtt um støðuna og økt um framleiðsluna á virkjunum. Tó eru nú tekin um, at minni nøgdir fara um uppboðssøluna. Landsstýrið fer at fylgja væl við gongdini, og um neyðugt verða tiltøk sett í verk til tess at tryggja, at so nógv sum gjørligt fer um uppboðssølu.

Samanumtikið eru útlitini fyri fiskiveiðuna hjá føroyingum í 1999 rímuliga góð. Hóast tekin eru um, at veiðan ikki verður eins stór sum hesi tvey seinastu avbera góðu fiskiárini, so eru fiskastovnarnir undir Føroyum á einum burðardyggum stigi, og enn eru fiskaprísirnir høgir. Hetta er ein gongd, sum vit kenna og mugu laga okkara skipanir eftir. Eisini fiskivinnan á landi mennir seg og er byrjað at framleiða hávirðisvørur.

## Heildarætlan

***Lógin um vinnuligan fiskiskap***

Lógin um vinnuligan fiskiskap varð broytt í fjør. Loyvt var at leggja veiðuloyvi saman, og fiskirættindini gjørdust í ávísan mun meira umsetilig. Neyðugt verður at leggja nýtt broytingaruppskot fyri løgtingið. Tað fer at hava til endamáls at gera reglurnar um ognarviðurskifti greiðari, at gera veiðirættindi umsetiligari, herundir fortreytirnar fyri at leggja veiðiloyvi og fiskirættindi saman, og annars sum heild at geva fiskivinnuni rúmari ræsur at arbeiða undir. Lógaruppskotið verður lagt fram í tveimum pørtum. Uppskot um fiskidagar verður lagt fram fyri seg og aðrar broytingar í lógini fyri seg.

***Burðardygd***

Landsstýrið fer framvegis at reka ein varnan fiskivinnupolitik, har fiskivinnan kann bera seg við tí tilfeingi, ið grunnarnir á Føroyaleiðini og avtalur við onnur lond geva. Fiskastovnarnir undir Føroyum skulu gagnnýtast burðardygt. Hetta verður gjørt við at varðveita skipanirnar við fiskidøgum, stongdum økjum og friðingum á gýtingarleiðum. Málið er, at skipanin er so liðilig sum gjørligt, og at veiðitrýst og tilfeingið samsvarar so væl, at tað gevur besta lønsemið fyri allar partar.

***Fiskidagaskipanin***

Fiskidagaskipanin hevur nú verið í gildi í 3 ár, og skipanin er aftur í ár eftirkannað av altjóða viðurkendum serfrøðingi. Úrslitið av hesum arbeiði er, at skipanin tænir sínum endamáli, og at hon er ein betri skipan enn kvotaskipanin, sum var galdandi undan fiskidagaskipanini. Dentur má tó leggjast á at fylgja væl við skipanini, so veiðitrýstið ikki veksur.

***Veiðiflotin***

Sum avtalað í samgonguskjalinum, verður nýggj lóg um at endurnýggja veiðiflotan løgd fyri løgtingið. Endamálið er, at veiðiflotin verður endurnýggjaður og soleiðis samansettur, at hann ber seg fíggjarliga við tí tøka tilfeinginum.

Í eini tillagingartíð er umráðandi at hava eina skipan, ið er so liðilig sum møguligt, so tað er vinnan sjálv, sum broytist við tíðini. Politikkarar skulu skapa karmar, sum vinnan so vítt møguligt sjálv skal arbeiða innanfyri.

***Veiðitrýst***
Sambært fiskifrøðingum er veiðitrýstið á landleiðini ov stórt. Hetta kann minkast við at skip fáa møguleikar fyri at fara í alternativa veiði sum gulllaksaveiði og aðra veiði á djúpum vatni. Landsstýrið gjørdi eina roynd í vár fyri lemmatrolarar undir Føroyum, men hetta fekst ikki semja um í løgtinginum, og tí mugu aðrir møguleikar roynast.

Tað eigur at vera havt í huga, at flestu av teimum veiðimøguleikum og kvotum, sum føroysk skip hava uttan fyri 200 fjórðinga fiskimarkið sambært fiskiveiðuavtalunum við onnur lond, verður býtt um við tilfeingið á landleiðunum. Avtalurnar við onnur lond ávirka tí eisini føroysku fiskimøguleikarnar í føroyskum øki.

***KT í fiskivinnuni***
Tað er av stórum týdningi, at ein fiskivinnutjóð altíð hevur góð veiðihagtøl, tað veri seg fyri avreiðingar, fiskidagar ella útlendska veiði í føroyskum sjógvi. Til tess at bøta um hetta økið, er farið undir at laga veiðihagtalsskipanina til nútíðar kunningartøkni.

***Almennur stuðul***
Almenni stuðulin til fiskivinnuna er nógv minkaður seinastu árini. Útreiðslukrevjandi skipanir eru broyttar, serstakliga tær sum elva til ovurorku. Framvegis eru tó skipanir, sum kunnu gerast útreiðslukrevjandi, um fiskiskapurin, sum hevur verið ræattuliga góður í 1997 og 1998, minkar aftur í framtíðini. Landsstýrið fer tó at varðveita neyðuga inntøkutrygd og aðrar tíðaravmarkaðar skipanir, sum føra til menning og nýskapan.

Stuðulin til nýggj tiltøk í fiskivinnuni á landi er tó øktur. Dentur verður lagdur á at stuðla tilevningini av innaneftirlitsskipanum og skeiðvirksemi í fiskivinnuni á landi.

Hóast samlaði stuðulin er nógv minkaður, er úrslitið hjá vinnuni munandi betri. Hetta er tí rætta gongdin, og hildið verður fast við hesa kós. Endamálið er at skapa fortreytir, sum so líðandi gera stuðulin óneyðugan.

## Fiskivinnusamráðingar
Fiskiveiðisamráðingarnar í 1999 hava gingið væl, hóast avtalurnar eru á nakað lægri stigi enn í 1998. Serstakliga eru botnfiskakvoturnar í Barentshavinum minkaðar, og hóast fiskiveiðiavtalur eru millum Føroyar og Baltisku londini, so eru ongar kvotur tøkar í Eystursjónum í 1999. Útlendsk skip eru samsvarandi skerd á føroysku landleiðini.

Útlitini fyri uppsjóvarveiðuni eru tey somu sum í fjør og við nýggjum skipum í føroyska veiðiflotanum, verða kvoturnar betri gagnnýttar enn higartil. Haraftrat kann avtalan við Grønland gerast spennandi í framtíðini, um toskurin kemur aftur í grønlendskan sjógv, tí tað hevur eydnast at fáa tosk við í avtaluna. Samanumtikið eru fiskiveiðimøguleikar okkara í íslendskum og grønlendskum sjógvi betri í 1999, enn teir vóru í 1998.

***Noreg***
Gongdin er, at føroyska toskakvotan lækkar. Fyri at bøta um veiðimøguleikan hjá føroyskum skipum, nú fiskiskapurin sum heild er so nógv minkaður í Barentshavinum, eru størri nøgdir av toski, hýsu og øðrum fluttar úr russiska partinum av Barentshavinum í norska partin.

***Svalbard***
Veiðirættindini við Svalbard eru minni fyri botnfisk í mun til MLV´ið, og fiskidagaskipanin í rækjuveiðini við Svalbard stendur við óbroytt.

***Russland***
Í sáttmálanum við Russland er botnfiskakvotan minkað fyri tosk og hýsu, meðan flatfiskakvotan er hægri og rækjukvotan óbroytt. Russar fáa nakað meira av svartkjafti í føroyskum sjógvi, men makrelveiðan er avmarkað.

***ES***
Fiskivinnusamráðingar við ES broyttu ikki býtið millum partarnar, og kvoturnar eru tær somu sum í 1998. Sum nakað nýtt skulu skip eftir 1. januar ár 2000 nýta fylgisveinaútgerð, tá tey fiskað í ES-sjógvi.

***Strandalond***
Samráðingar hava verið millum strandalondini Russland, Noreg, ES, Ísland og Føroyar um fiskiskapin eftir norðhavssild í 1999. Grundað á tilmælið frá ICES um at minka veiðina úr 1,5 mió niður í 1,2 mió. tons samtyktu strandalondini, at heildarveiðin fyri 1999 ikki skal fara upp um 1,3 mió. tons. Hetta er óbroytt frá 1998, og lutfallið millum strandalondini er óbroytt. Útlitini fyri ár 2000 benda á møguleika fyri smærri hækkingum.

Skipanin fyri fiskiskapi eftir makreli er nú tikin til viðgerðar millum strandalondini ES, Føroyar og Noreg, og málið um makrel og svartkjaft er somuleiðis tikið til viðgerðar í NEAFC. Roynt verður at finna eina hóskandi umsitingarskipan fyri makrel og svartkjaft grundað á ferðingamynstur og veiði. Eingin avgerð er tikin enn, og samráðingarnar halda fram í ár.

***NEAFC***
Fyri fiskiskap í NEAFC-skipanarøkinum í Norðureysturatlantshavinum eru viðtøkur gjørdar fyri fiskiskap á opnum havøki, í altjóða sjógvi, um fiskiskap eftir sild, svartkjafti og kongafiski, um fiskiveiðieftirlit og um at samskipa innsavningina av veiðihagtølum. Ásetingarnar eru gjørdar sambært broytingum í havrættarsáttmálanum, ST-semjuni um vernd og umsiting av millumøkjastovnum og víðferðandi fiskastovnum og FAO avtaluni um fiskiskap við ábyrgd.

NEAFC ásetti fiskiskapin í altjóða sjógvi eftir norðhavssild grundað á strandalandaavtaluna í fjør fyri fiskiárið 1999. Heildarveiðin av svartkjafti varð ásett samsvarandi tilráðingini frá ICES til 650 tús. tons, men veiðitrýstið á svartkjaftastovnin er økt so nógv í 1998-99, at tiltøk mugu setast í verk fyri at tryggja eina skynsamliga veiði. Fyri heildarveiðina eftir kongafiski í Irmingarhavinum er MLV´ið sett til 150 tús. tons., men útlitini eru ikki góð vegna ovveiðu. Tí mælir ICES til munandi niðurskurð. Fiskifrøðingar mæla til, at heildarveiðan ikki fer upp um 85 tús. tons, og væntandi minka kvoturnar hjá limalondunum samsvarandi.

Fiskiskapurin á djúpum vatni varð eisini viðgjørdur, og samtykt varð at gera eina betri fráboðanarskipan fyri hesa veiði.

*NAFO*

Fyri NAFO skipanarøkið í Norðurvesturatlantshavinum eru viðtøkur ásettar um fiskiskapin uttan fyri 200 fjórðinga fiskimark hjá strandalondunum Kanada og Grønlandi. Vísindaliga nevndin kom við nýggjum tilráðingum t.d. fyri rækjur á Flemish Cap. Fiskivinnunevndin hjá NAFO ásetti kvotur fyri øll høvuðsfiskasløg og ásetti reglur fyri rækjufiskiskapi á Flemish Cap.

Fyri Føroyar hevur rækjuveiðin og toskurin á Flemish Cap størsta týdningin. Í vísindaligu ráðgevingini um toskin á Flemish Cap varð beinleiðis mælt til bann fyri toskaveiðu í 1999. Hetta varð samtykt annað árið á rað. Svartkalvakvotan er óbroytt í mun til 1998, og rækjuveiðan er skipað við mest loyvdu døgum og mest loyvdum skipatali.

Ásettar eru reglur um tiltøk móti londum, sum veiða á økinum, og sum ikki eru limir í NAFO. Reglurnar fevna um tekniskar reguleringar, fiskiveiðieftirlit, reglur um fylgisveinaeftirlit og eygleiðaraskipan, reglur um trætur og mótmæli móti ásetingum, um fyrivarni í fiskiskapinum, kvotuásetan og ásetan av fiskirættindum og um langtíðarleigu av skipum.

***Baltisku londini***

Striltið hevur gingist at fáa avtalu við øll tey Baltisku londini, tí tey hava ikki skip til fiskiskap í føroyskum sjógvi. Partarnir hava havt eitt samráðingarumfar. Semja var um at halda rammuavtaluna og gera avtalu, hóast ongar sínámillum kvotur eru ásettar. Avtalan snýr seg um annað samstarv á fiskivinnuøkinum og bindandi tilsagnir, um støðan í fiskastovnunum í Eystursjónum gerast lívfrøðiliga betri.

***Uppsjóvarveiði***

Møguleikar eru fyri øktum veiðimøguleikum eftir uppsjóvarfiskasløgum sum norðhavssild, svartkjafti og lodnu. Veiðivirðið av uppsjóvarfiskasløgum og ídnaðarfiski er nú vaksandi aftur eftir stóra prísfallið. Áhugin at veiða uppsjóvarfiskasløg er vaksandi.

***Onnur veiði***

Føroysk skip hava fingið loyvi at veiða tunfisk í føroyskum sjógvi. Hetta kann gerast eitt gott ískoyti til búskapin, um hesin fiskiskapur veruliga kann fara fram einar 4 mánaðir um árið, og hetta kann í longdini geva okkum møguleikan fyri at fiska í altjóða sjógvi. Støða eigur at verða tikin til veiði í altjóða sjógvi, áðrenn vertíðin er av. Laksaveiðan verður væntandi tikin uppaftur í heyst.

## Fiskiveiðieftirlit

Fiskimálastýrið hevur gjørt sáttmála við skipasmiðju í Noregi um at byggja nýtt vaktar- og bjargingarskip. Skipið verður liðugt næsta heyst. Miðað verður ímóti, at fiskiveiðieftirlitið undir Føroyum og bjargingartænastan kann fremjast við tveimum góðum skipum og einum minni vaktarbáti umframt tyrlutænastu. Ætlanin er at samskipa tyrlutænastu til bjarging, sjúkraflutning og ferðaflutning. Eftirlitið á sjónum skal eisini fevna um ta víðkan, sum NEAFC og NAFO hava sett í verk.

Frá 1. januar 2000 skulu øll skip, sum fiska í ES-øki, hava fylgisveinaútgerð umborð. Skipanin er longu roynd á NAFO økinum, og hon hevur til endamáls at fáa javna fráboðan um knattstøðu hjá skipunum. Seinni verður henda skipan útbygd til at umfata allar fráboðanir.

NEAFC arbeiðir eisini við at fáa somu skipan setta í verk fyri Norðureysturatlantshavið. Fiskimálastýrið hevur reist spurningin, um ein tílík skipan kann setast í verk fyri øll skip í føroyskum sjógvi, serstakliga fyri at økja um trygdina.

## Sjóvinna

Fyri tveimum árum síðan varð ein skipan við leiguskráseting (bareboat chartering) sett í verk. Endamálið er at menna kappingarførið hjá handilsskipum og at veita føroyskum og útlendskum fiskiskipum við føroyskum áhugamálum lættari atgongd til fiskikvotur. Føroysk skip, sum eru skrásett undir fremmandum flaggi, hava verið við til at gagnnýta ónýttar fiskikvotur, og hevur hetta givið eitt gott íkast til føroyska búskapin. Dentur hevur verið lagdur á at loyva leiguskráseting, har fiskiveiðimøguleikarnir ikki verða fullnýttir.

Fyri at lúka nýggju krøvini frá IMO og tað vaksandi eftirlitið við handils- og fiskiskipum, eru broytingarnar framdar í manningarlógini og tilhoyrandi fyriskipanum. Skipanin um trygdarskeið fyri sjómenn er sett í verk, og ætlanin er, at allir sjómenn innan apríl ár 2001 skulu hava tikið hetta skeið. Trygdarskeiðini fara fram í Klaksvík, har íløgur eru gjørdar til endamálið.

### *FAS*

Ávísar broytingar eru gjørdar í lóg og kunngerð um FAS-skipanina, men fleiri broytingar eru neyðugar, um skipanin skal vera betri kappingfør við aðrar líknandi skipanir. Her kunnu gerast ávísar reguleringar í skatta- og avgjaldstreytum. Viðurskifti, sum hava við trygd at gera, fylgja altjóða reglum.

### *Skipaeftirlit*

Landsstýrið setti sær sum mál í mai 1998 at yvirtaka skipaeftirlitið. Ein nevnd er síðan farin undir at gera uppskot um, hvussu hetta kann gerast. Nevndin skal m.a. gera uppskot um føroyska lóggávu innan skipatryggleika, lóg um sjóreglur og sigling, sjólóg og annars greina øll viðurskifti millum Føroyar og Danmark, so yvirtøkan kann fremjast. Nevndin hevur eisini fingið til uppgávu at fáa greiðu á, um Føroyar kunnu fáa sjálvstøðugan limaskap í IMO, altjóða havfelagsskapinum undir ST.

## Hvalaveiða

Landsstýrið heldur fast við, at súgdjór í havinum eiga at verða gagnnýtt á burðardyggan hátt og virkar fyri øktum samstarvi við aðrar tjóðir á hesum øki. Dentur verður lagdur á viðurskifti, sum ávirka hval og kóp.

Føroyska millumlandasamstarvið um burðardygga umsiting av súgdjórum í Norðuratlantshavi fer fram i NAMMCO, sum ásett í havrættarsáttmálanum. Harumframt er karmur gjørdur um vísindaligt samstarv, sum skal tryggja burðardygga gagnnýtslu av súgdjórum í føroyskum sjóøki.

Grindahvalurin er ikki hóttur, og grindadráp heldur fram. Støða eigur at vera tikin til, um Føroyar skulu fara undir at veiða smáhval sum døgling og sildreka, tá tað er vísindaliga staðfest, at hesir stovnar ikki eru hóttir í Norðuratlantshavi.

# Vinnumál

## Vinnupolitikkur

Landsstýrið hevur júst orðað ein yvirskipaðan vinnupolitikk, har hugsjónin er ein sjálvberandi búskapur, ið byggir á fleiri ymiskar vinnur, sum skapa avkast, framburð og vælferð í fríari, altjóða kapping, og sum raðfesta trivnað og umhvørvið ovarlaga.

Tað almenna skal tryggja vinnunum ávísar støguðar karmar við virðing fyri trivnaði og umhvørvi. Vinnuligu karmarnir verða støðugt raðfestir, soleiðis at vinnan fær rúm, ræsur og frið at virka eftir marknaðarbúskaparligum treytum sambært hugsjónini aftan fyri vinnupolitikkin.

Miðað verður eftir at skapa karmar, har vinnan megnar at mennast og fylgja altjóða rákinum. Hon skal vera nýskapandi og hava dagførda vitan og fjøltáttað samskifti við virðing fyri okkara samfelagi.

Tær mest átrokandi broytingarnar og ábøturnar á karmarnar eru:

- Tillagað og virkið regluverk til altjóða marknaðarsamstarv
- Vælvirkandi samskifti og samferðslu við útheimin
- Gransking og førleikamenning
- Vælútbygt undirstøðukervi, sum mennir kappingarførið um alt landið
- Góðar eginfíggingarskipanir og lagaligar skatta- og avgjaldsskipanir
- Varlig vinnulóggeving og fyrimyndarligt alment tænastustig
- Einfaldar og studningsveikar vinnuframaskipanir

Málsetningurin er, at vinnukarmarnir eru eins góðir og í øðrum samfeløgum, soleiðis at vinnan, kapitalurin og arbeiðsmegin trívast og fjølgast í Føroyum.

Aðalorðaskifti hevur verið um vinnupolitikk landsins, og fekk hann góða undirtøku. Farið verður nú undir at orða politiska málið fyri einstøku vinnugreinarnar, herundir eisini innan kunningartøkni, bioteknologi og fíggjarvinnu.

Uttan mun til hvørjar karmar tað almenna skapar fyri at tryggja eitt framhaldandi gott kappingarføri hjá vinnuni, verður tað fyrst og fremst hugflog og framfýsni hjá tí einstaka, sum skapa virðini í samfelagnum.

### *Vinnuframi*

Farið verður undir at endurskoða grunnin til ídnaðarfremjandi endamál og í hesum sambandi at gera tað meira sjónligt, at grunnurin ikki bert er ætlaður vanligum ídnaði, men eisini skapandi vinnum sum kunningartøkni og tónleiki.

Ætlanin er at gera vinnuframaskipaninar meira einfaldar. Fyritøkur og einstaklingar skulu fáa lættari atgongd til tøka ráðgeving og tænastur. Skipanin fer í høvuðsheitinum at fevna um grunnin til ídnaðarfremjandi endamál og Framtaksgrunnin. Vinnumálastýrið heldur eisini, at ein føroyskur partabrævamarknaður kann gerast ein týðandi táttur, tá nýtt virksemi skal setast á

á stovn og verandi fyritøkur mennast.

Størri orka verður sett av til at loysa uppgávurnar, sum vinnuframastovnarnir TK-stovan og Menningarstovan umsita, soleiðis at betri tænasta verður veitt vinnuni og persónum, sum ætla at stovna nýtt virksemi. Eisini verður arbeitt við at umskipa og styrkja marknaðarføringina uttanlands av føroyskum vinnum og Føroyum sum heild.

***Føroyar sum tilfeingisdepil og tænastumiðdepil***

Landsstýrið kannar, hvussu kann komast enn longur á leið, fyri at Føroyar kunnu gerast ein týðandi tilfeingis- og tænastumiðdepil í Norðuratlantshavinum. Ávís menning er á økinum, og íløgur eru og verða gjørdar í goymslur og havnir í fleiri støðum í landinum.

***Ídnaður og tænastuvirksemi***

Kappingarførið hjá vinnuni versnaði í samband við síðstu lønarsamráðingar, og skal kappingarførið ikki framhaldandi versna, verður neyðugt at endurskoða skatta- og avgjaldsskipanirnar.

***Handil og søla***

Seinnu árini er gjørt eitt miðvíst arbeiði fyri at menna marknaðarføringina uttan fyri Føroyar. Hetta er ein týðandi táttur í strembanini eftir at gera føroyska vinnu meira fjøltáttaða og føroyska samfelagið meira sjálvbjargið. Landsstýrið fer at leggja enn størri dent á hetta arbeiðið, sum kann hjálpa fyritøkunum at víðka um marknaðin fyri føroyskar vørur og tænastur.

Betraða handilsavtalan við ES gevur fiski- og alivinnuni størri møguleikar á ES-marknaðinum bæði viðvíkjandi viðgjørdum og óviðgjørdum vørum.

***Alivinna***

Framleiðslan av alifiski og vørum úr alifiski øktist munandi í 1998 og heldur hesin vøkstur fram. Útflutningsvirðið av alifiski og vørum úr alifiski var 448 mió. kr. í 1998 og økist væntandi upp í uml. 700 mió. kr. í 1999.

Lutfallið millum útflutningin av óviðgjørdum og viðgjørdum alifiski broytist eisini rætta vegin. Støðugt meira av alifiskinum verður útfluttur sum viðgjørd vøra.

Í 1998 varð farið undir regluligar kanningar av umhvørvinum. Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Biofar standa fyri hesum kanningum, sum er liður í miðvísa umhvørvisarbeiðinum, ið verður gjørt innan alivinnuna.

Í samráð við alararnar og myndugleikarnar á staðnum eru nú øll aliøkini teknaði upp av nýggjum. Hetta er ein liður í arbeiðnum at dagføra aliloyvini í tráð við ali- og umhvørvispolitikk landsstýrisins.

Góð heilsustøða hjá alifiskinum er ein týðandi fortreyt fyri at tryggja støðuga og lønandi framleiðslu í alivinnuni. Hetta er somuleiðis ein treyt fyri, at útflutningur til ES og aðrar marknaðir kann halda fram ótarnaður uttan heilsufrøðiligar avmarkingar. Tí hevur landsstýrið sett sær fyri at stuðla verkætlanum viðvíkjandi sjúkufyribyrging innan fiskaaling.

Miðvísa arbeiðið við kynbótum saman við P/F Fiskaaling heldur fram, samstundis sum farið er av álvara undir royndir við at ala kalva. Miðað verður eftir, at alingin kann førka seg longur út móti streymasjógvi, so grundarlag er fyri framhaldandi vørkstri.

***Landbúnaður***
Landsstýrið fer at taka stig til aðalorðaskifti í komandi tingsetu um viðurskiftini hjá landbúnaðinum, og herundir eisini tey fíggjarligu viðurskiftini hjá festibóndunum.

## Samskifti

***Samferðsluætlan***
Vinnumálastýrið legði fyrst í hesum árinum fram frágreiðing um, hvussu samferðslukervið í Føroyum sum heild skal skipast. Grundað á frágreiðingina var niðurstøðan, at arbeiðast skal fram ímóti, at Vágoyggin og Norðuroyggjar fáa fast samband við meginøkið. Eisini skal nýtt skip bøta um sambandið við Suðuroynna.

Landsstyrið ætlar at fremja hesar verkætlanirar, sum fara at bøta um umstøðurnar fyri økismenning. Tá verkætlanirnar eru framdar, verða uml. 85% av føroyingum knýttir saman við beinleiðis vegasambandi.

***Fjarskifti***
Skulu Føroyar gera seg galdandi sum eitt av framkomnu kunningarsamfeløgunum, er ein treyt, at vit hava væl útbygdar fjarskiftistænastur. Tí er neyðugt, at elektroniska veganetið bæði innanoyggja og til og úr Føroyum, er nøktandi.

Fyri at røkka hesum máli er ætlanin at loyva fleiri veitarum inn á fjarskiftismarknaðin. Telefonverkið hevur mist sín aldargamla einkarrætt, og kunnu aðrir nú eisini fáa konsessión til at reka fjarskiftisvirksemi.

***Postvirksemi***
Landsstýrið fer at leggja fram uppskot til eina nýggja lóg fyri postvirksemi og Postverk Føroya. Leisturin til lógaruppskotið fer at líkjast tí fyri fjarskiftisøkið. Tí eisini hetta øki er fyri liberaliseringum, og mugu lógarkarmarnir lagast samsvarandi.

***Tilbúgving***
Arbeiðið við at gera eina føroyska tilbúgvingarætlan er nú byrjað, og væntandi fer hetta arbeiði at taka eini 2-3 ár.

***Ferðsla***
Í komandi tingsetu verður skipað fyri orðaskifti um ferðslutrygd. Grundarlagið fyri orðaskiftinum verður tann sonevnda null-hugsjónin.

***Ferðavinna***
Ferðavinnan í Føroyum mennist støðugt og hon gevur eitt gott íkast til samfelagsbúskapin. Hagtalsgrundarlagið er tó ikki enn nóg gott, men verða nú nágreiniligari hagtøl fingin til vega.

Við støði í marknaðarkanning eru Ferðaráð Føroya og flutningsfeløgini farin at samstarva um felags marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannaland. Tiltakið hevur eydnast væl, og er ætlanin at halda fram við lýsingarátakinum næsta ár.

Ferðaráðið ger saman við økisfeløgunum eina felags menningarætlan, har dentur verður lagdur á at menna og samskipa ferðavinnuna í økjununum eitt nú við ferðatilboðum og ráðgeving. Endamálið er at skapa inntøkumøguleikar í ferðavinnuni um alt landið.

Landsstýrið hevur ætlanir um at fara undir at dagføra politikkin á ferðavinnuøkinum í ár.

***Kunningartøkni***

Ein føroyskur KT-politikkur má hava sum høvuðsmál at menna Føroyar til eitt kunningarsamfelag á hædd við tey mest framkomnu, og verður dentur lagdur á, at borgarnir skulu hava lætta atgongd til at nýta og at nema sær útbúgving innan kunningartøkni. Eisini eiga allir borgararnir at fáa eins góðar møguleikar at brúka kunningartøkni, so vit ikki fáa eitt býti millum A og B borgarar á hesum øki.

Sum vinna er kunningartøkni í stórum vøkstri. Eyðkenni fyri vinnuna er stór virðisøking, at fjarstøða ongan týdning hevur, og at rávøran er fólksins vitan.

Útbúgving er hornasteinurin, um ein føroyska KT-vinna skal mennast. Fortreytin er tí, at hægri útbúgvingar innan kunningartøkni verða settar á stovn í Føroyum, og at bygt verður upp eitt granskingarumhvørvi í samstarvi við vinnuna. Í hesum sambandi er at fegnast um avtaluna, sum gjørd er millum Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Føroya Tele um prísir á internettænastum til føroyskar skúlar.

### Arbeiðsmarknaður

Í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum verður hildið fram við arbeiðinum at gera eina skipan, sum kann loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum so skjótt, tær koma í. Eisini verður skipanin fyri semingsstovnin endurskoðað, soleiðis at hon m.a. fer at fevna um allan arbeiðsmarknaðin.

Lóggáva um arbeiðsumhvørvi verður endurskoðað saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Virkað verður fyri, at allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum verða javnsettar í samband við barnsburð. Í hesum sambandi verður barnsburðargrunnur settur á stovn, og fer ein slíkur grunnur at hava við sær, at kostnaðurin av barnsburðarfarloyvum verða meira útjavnaðar millum tey einstøku arbeiðsplássini.

## Oljumál

Nú landgrunsmarkið millum Føroyar og Bretland er ásett, er ferð sett á arbeiðið við at fyrireika útbjóðing av økjum til oljuleiting á føroyska landgrunninum. I hesum sambandi hevur landsstýrið eisini avgjørt at seta á stovn eitt oljumálastýri at taka sær av hesum málum. Hetta

Hetta er somuleiðis ein ásannan av, at kanningarnar, sum seinnu árini eru gjørdar av føroyska landgrunninum, benda á, at roknast kann við rættiliga víttfevndum leitivirksemi komandi árini.

Oljumálastýrið tekur støði í verandi oljumáladeild og Jarðfrøðisavninum. Greitt er hinvegin, at uppgávurnar hjá stýrinum eru vaksandi orsakað av útbjóðingarumfarinum og seinni loyvisumsitingini. Neyðugt verður tí at økja starvsfólkatalið, og eisini at nýta pening til ráðgeving av ymiskum slagi. Hinvegin eigur starvsfólkatalið í oljumálastýrinum ikki at verða sett eftir arbeiðsbyrðuni í útbjóðingarumfarinum, tí hetta er ein hátyngd, ið verður í eina avmarkaða tíð.

Miðað verður ímóti at leggja fram uppskot til løgtingslóg um øki og treytir fyri fyrsta útbjóðingarumfar í heyst. Tíðarætlanin er knøpp, men við serkønari hjálp og arbeiðsbólkum, har starvsfólk úr øðrum aðalstýrum eru við, kunnu uppgávurnar verða loystar til ásetta tíð. Tað er umráðandi, at almenna umsitingin samstarvar um ta avbjóðing, sum komandi vinnan setir føroyskum myndugleikum.

Sambært kolvetnislógini skal útbjóðingarlógin áseta, hvørji øki verða boðin út og almennu treytirnar, ið skulu setast. Harumframt skal uppskotið um útbjóðing lýsa onnur týdningarmikil viðurskifti, eitt nú ávirkanina, ið oljuvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðra vinnu eins, og hvussu náttúra og umhvørvi verða ávirkað. Tað er umráðandi, at hædd verður tikin fyri áhugamálunum hjá fiskivinnuni, nú oljuleitingar byrja á leiðum, har fiskiveiða vanliga fer fram. Ein samstarvsnevnd er sett, har ymsu fiskivinnufeløgini og fiskivinnu- og oljumyndugleikarnir eru umboðaðir. Samstarvsnevndin fær høvi til at siga sína hugsan um útbjóðingarøkini og tær avmarkingarnar, ið verða settar fyri oljuvinnu á økinum, eitt nú tíðaravmarkingar fyri bori- og seismikkvirksemi.

Útbjóðingarlógin tekur eisini støðu til, hvørjar møguleikar føroyskt vinnulív eigur at fáa, fyri at verða við í oljuvinnuni. Landsstýrið hevur sett sær fyri, at oljuleitingin fyrst og fremst eigur at menna førleikan í føroysku vinnuni, so hon kann laga seg til broytingar og gerast kappingarfør í altjóða høpi. Hetta samsvarar við almenna vinnupolitikkin, og komandi treytirnar mugu tí m.a. lagast eftir:

- møguleikanum, sum føroyskt vinnulív hevur fyri at bjóða tær tænastur, ið oljufeløgum tørvar,
- førleikanum, sum føroyska samfelagið vil byggja upp, og
- krøvunum, ið altjóða kapping í oljuvinnuni setir.

Týdningarmesti parturin av leitingarloyvunum eru sonevndu *arbeiðsskyldurnar*. Tær áseta, hvat loyvishavarin skal gera fyri at staðfesta, um olja- ella jarðgass eru at finna í loyvisøkinum. Arbeiðsskyldurnar verða ásettar, eftir at boðini frá umsøkjarunum eru komin inn, og vanliga eftir samráðingar millum umsøkjaran og myndugleikarnar.

Tá løgtingið hevur samtykt útbjóðingarlógina, verður lýst eftir umsóknum, og gongst sum ætlað, verða fyrstu leitingarloyvini latin komandi summar.

# Umhvørvismál

Uppskot um nýggja kgl. fyriskipan til verju av havumhvørvinum varð samtykt í løgtinginum í vár.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal umsita lógina, og er hon farin undir at fyrireika seg til uppgávuna. Hetta økið fer at hava stóran týdning í sambandi við komandi oljuvinnuna, og tí verður neyðugt at styrkja umhvørvisumsitingina, so hon verður før fyri at umsita lógarverkið á forsvarligan hátt og taka við teimum avbjóðingum, sum nýggja vinnan setir.

Næsta ár er ætlanin at seta ein arbeiðsbólk, ið skal gera eina heildarætlan fyri føroyskan umhvørvispolitikk. Setningurin fyri verkætlanina verður orðaður seinni í ár. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug um eini tvey ár, og verður frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum grundarlag undir einum aðalorðaskifti um umhvørvisspurningar.

Stórt sæð øll aling á sjónum er nú umhvørvisgóðkend sambært umhvørvisverndarlógini. Botn-kanningar eru gjørdar á firðunum fyri at kanna, hvørja ávirkan aling á sjónum hevur á umhvørvið. Hesar kanningar skulu m.a. vera grundarlagið undir metingum av, hvussu nógva aling firðirnir tola. Arbeitt verður eisini við at umhvørvisgóðkenna smoltaling á landi. Arbeiðið við hesum góðkenningum verður gjørt í neyvum samstarvi við Vinnumálastýrið, sum umsitur lóg um aling.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan luttekur í ymsum norðurlendskum og arktiskum verkætlanum, hvørs endamál eru at kanna dálkingarviðurskiftini í hesum øki. Hetta er eitt vaksandi virksemi, og føroyingar mugu metast at hava sera góðan møguleika fyri at gera seg galdandi í hesum sambandi.

# Almanna- og heilsumál

## Almannamál

Á almannaøkinum hevur landsstýrið sett sær fyri at gera munagóð framtøk bæði viðvíkjandi lóggávuni og tænastum. Neyðugt er, at laga almanna lóggávuna til føroyskan tørv og føroysk viðurskifti, til tess at skapa eitt haldgott grundarlag undir einum vælferðarsamfelagi, har sínámillum ábyrgdin millum borgaran og myndugleikan eins væl og samhaldsfestið millum øll verður sett í hásæti.

Landsstýrið hevur sett sær fyri:

- at gera nýggja lóggávu, sum skal loysa av galdandi donsku forsorgarlógina og donsku barnaforsorgarlógina, og annars kunngerðir til lóggávu og fyrisiting,
- at bøta um støðuna innan eldrarøkt, eins væl og at bøta um bústaðarmøguleikarnar hjá teimum, sum av heilsuávum ella øðrum ávum ikki longur kunnu búgva heima,
- at bøta um umstøðurnar hjá rørslu- og menningartarnaðum við at menna bústaðar-, starvs- og samferðslumøguleikar teirra, og

- at gera eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur innan almanna økið.

Fyrireikingarnar til lóggávuna á almannaøkinum eru byrjaðar, og verða forsorgarlógin og barnaforsorgarlógin eftir ætlan lagdar fyri løgtingið í heyst. Dentur verður lagdur á at gera lóggávuna so einfalda sum møguligt, og landsstýrið skjýtur upp, at lóggávan á almannaøkinum fær felagsheitið *trivnaðarlóggávan.*

***Pensjónsøkið***
Á pensjónsøkinum er fyrsta stig tikið til at bøta um umstøðurnar hjá teimum eldru. Ein nýggj pensjónslóg er samtykt og kemur í gildi næsta ár. Henda lóg er nú ein føroysk løgtingslóg, sum er munandi einfaldari hjá vanliga borgaranum at skilja. Seinni í ár er ætlanin at leggja fyri tingið uppskot til løgtingslóg, sum ásetir og javnar upphæddirnar sambært pensjónslógini. Pensjónistarnir fara at merkja eina munandi hækking í pensjónsviðbótunum.

Somuleiðis er ætlanin at gera eitt uppskot, sum tryggjar, at allir pensjónistar - bæði fyritíðar- og fólkapensjónistar - fáa pensjón, sama um teir búgva heima, á stovni, røktarheimi ella í sambýli. Samstundis verður arbeitt við spurninginum um, hvussu føroyska samfelagið í framtíðini skal megna at tryggja føroyingar fíggjarliga á ellisárum.

Talið á pensjónistum økist lutfalsliga í mun til samlaða fólkatalið, og tað er eyðsæð, at verandi pensjónsskipan í longdini ikki fer at megna at geva okkara pensjónistum nøktandi veitingar. Tí er neyðugt, at hin einstaki eisini í størri mun tryggjar sín egna aldurdóm. Her ætlar landsstýrið at bróta upp úr nýggjum, við at seta í gildið eina skipan, sum áleggur øllum lønmótakarum at gjalda til pensjónsuppsparing. Á henda hátt fer tann peningur, sum innan fyri verandi fíggjarligu karmar er tøkur til pensjónir, at røkka munandi longur. Møguleiki fer at verða fyri, at bøta um pensjónirnar hjá teimum, sum ikki eru vanligir løntakarar og hjá teimum veikastu í samfelagnum. Allar hesar lógir fáa gildi frá 1. januar ár 2000.

***Forsorgarøkið***
Bæði lóggávan og útinnandi fyrisitingin á forsorgarøkinum skal hava til endamáls at seta viðskiftafólkini í miðdepulin, at seta karmar og at geva møguleikar fyri, at óhjálpin gerast sjálvhjálpin. Endamálið er, at so fáir borgarar sum møguligt koma í eina støðu, har tørvur er á varandi veitingum. Í nýggju lóggávuni skal størri dentur leggjast á, at veitingar og málsviðgerð miðvíst hevur til endamáls at búgva út førleikaskerdar borgarar, so teir veruliga verða førir fyri at taka ábyrgd av egnari tilveru og fáa eitt arbeiði, um tað á nakran hátt ber til. Samstundis skal samfelagið tryggja viðskiftafólkini í teirra veiku støðu.

Endamálið við lóggávuni er eisini at rationalisera málsviðgerð og mannagongdir, so orka verður tøk til verulig sosialpolitisk framtøk. Harumframt er endamálið at áseta sínaámillum skyldur og rættindi millum borgaran og almennu skipanirnar, herundir at áseta í hvønn mun viðskiftafólk hava skyldu til at taka við arbeiðs-, útbúgvingar- ella endurútbúgvingartilboðum, og hvørji viðurskifti land og kommunur eiga at tryggja í hesum sambandi eitt nú barnaansing.

***Sosialnevnd***
Landsstýrið fer at seta eina sosialnevnd, ið fær til uppgávu at lýsa almannaøki í Føroyum í sínari heild, og at greina allar galdandi veitingarskipanir. Nevndin skal gera eitt tilmæli til

landsstýrismannin um, hvussu vit skipa okkara almannaverk, so hon verður einføld, greið og rættvís og fyribyrgir og tekur burtur møguligar dubultfunktiónir.

***Barnaansing***

Á barnaansingarøkinum ætlar landsstýrið at broyta lóggávuna soleiðis, at hendan uppgávan í framtíðini verður ein kommunal uppgáva burturav. Ein arbeiðsbólkur hevur latið landsstýrinum eitt tilmæli har mælt verður til, at broyta lóggávuna soleiðis, at barnaansingin burturav gerst ein kommunal uppgáva. Fyri at viga uppímóti teimum meirútreiðslum, sum hendan broyting hevur við sær fyri kommunurnar, mælir arbeiðsbólkurin til, at lógin um býtið av almannaútreiðslum verður avtikin.

***Eldrarøkt og bústaðarmøguleikar hjá teimum eldru***

Eisini á eldraøkinum standa landsstýrið, løgtingið og ikki minst kommunurnar fyri stórum av-bjóðingum. Økið er afturúrsiglt. Í neyvum samstarvi við m.a. Eldraráðið arbeiðir landsstýrið við at leggja eina langtíðarætlan fyri menning og útbygging á økinum.

Ábendingar vísa longu nú, at kring landið eru uml. 600 – 700 fólk á bíðilista. Landsstýrið miðar eftir, at hesin bíðilisti skal minka, og eiga vit sum skjótast at seta skjøtul á at byggja í minsta lagi eitt røktarheim afturat í Føroyum. Vit mugu ásanna, at tá ið ein borgari hevur tørv á røkt alt samdøgrið, er neyðugt at hava stovnspláss tøk.

Politikkur landsstýrisins er at gera tað møguligt hjá eldri fólki at búgva heima, so leingi sum hin einstaki ynskir tað, og er førur fyri tí. Landsstýrið arbeiðir eisini við at gera tað møguligt at fara undir at byggja egnaðar íbúðir til eldri fólk. Í hesum sambandi hava Húsalánsgrunnurin og Íbúðagrunnurin ein týdningamiklan leiklut. Tað er at fegnast um, at bæði Húsalánsgrunnurin og fleiri kommunur hava tikið stig til at fremja henda politikk í verki.

Til tess at fáa sum mest burtur úr játtanunum á eldraøkinum, eiga vit at umhugsa at samskipa allar tænastur á økinum betri, so røktarheim, sambýlir og heimarøkt verða rikin so væl saman, sum tilber. Á tann hátt verður skipanin smidligari, og betri møguleikar verða fyri at veita eina meira umfatandi samdøgursrøkt. Somuleiðis eiga vitjunartænasturnar, sum eru settar á stovn ymsastaðni í Føroyum, at verða stimbraðar.

***Umstøðurnar hjá rørslu- og menningartarnaðum***

Eisini á hesum øki er tað serstakliga bústaðartrupulleikin, ið er mest átrokandi. Sum ein byrjan er eitt íbúðafelag sett á stovn, ið hevur til endamáls at reka og keypa sambýlir til brekað. Ein tørvsmeting vísir, at 20 menningartarnað eru í bráðfeingis bústaðarneyð. Harafturat kemur íbúðartørvurin hjá rørslubrekaðum og fólki við sálarligum brekum. Hetta er eitt vandamál, sum vit eiga at leggja stóra orku í at loysa.

Fyrr í ár vóru Serforsorgin og Heimarøktin løgd undir somu leiðslu. Væntandi fer henda skipan at geva fleiri møgulekar fyri rationaliseringum, og sostatt eisini møguleikar fyri at byggja út eitt nú verkstaðstilboðini og uppvenjingartilboð til tey rørslu- og menningartarnaðu. Stórur tørvur er á tílíkum tilboðum nógva staðni í landinum.

## Heilsumál

***Fyribyrging***

Tørvur er á fyribyrgjandi arbeiði, bæði tá talan er um likamliga og sálarliga heilsu. Eisini er tørvur á fyribyrging móti sosialum trongstøðum.

Rættiliga stórt arbeiði verður gjørt, og nógvir peningur verður játtaður til at bøta um skaðan, sum ovurnýtsla av rúsevnum elvir til. Men lítið og einki verður gjørt til tess at upplýsa um vanda og skaða, ið stendst av royking. Ongastaðni í Evropa roykja so nógv ung sum í Føroyum. Hesa gongd eiga vit at broyta.

Ætlanin er í heyst at leggja fyri tingið eitt uppskot til løgtingslóg um fyribyrgingarráð. Ráðið skal verða mannað við fakfólki, sum skulu raðfesta uppgávurnar.

***Heilsuverk***

Arbeitt verður framhaldandi við at bøta um heilsutænastuna, herundir við ætlaðu útbyggingini á Landssjúkrahúsinum, sum er við á verandi fíggjarlóg. Neyðugt verður at samskipa veitingarnar á sjúkrahúsøkinum, so vit fáa eina betri og meiri fjøltáttaða tænastu fyri játtanirnar á økinum.

***Kommunulæknaskipan***

Í ár er sett í gildi nýggj løgtingslóg um kommunulæknaskipan. Lógin lýsir uppgávubýtið millum land og kommunu og onnur viðurskifti viðvíkjandi kommunulæknum. Sambært hesi lóg skal eitt ráð setast, ið skal gera tilmæli til landsstýrismannin, tá kommunulæknar skulu setast. Ráðið skal eisini gera tilmæli um meginreglur viðvíkjandi viðtaluhølum og um menning og broytingar í kommunulæknaskipanini. Tá ráðið er farið at virka, verður spurningurin um at menna og broyta kommunulæknaskipanina tikin til viðgerðar.

# Undirvísingar- og mentamál

Samfelag okkara mennist alsamt skjótari, bæði við ávirkan frá okkum sjálvum og uttanífrá. Viðurskifti okkara mótvegis Danmark eru eisini fyri grundleggjandi broytingum. Hetta setir stór krøv til skúlar, gransking og mentan. Samstundis fara støðugt fleiri av okkara ungdómum undir víðari útbúgving eftir fólkaskúlan.

Rákið er, at støðugt fleiri ganga longri í skúla. Hetta er at frøast um, tí hetta er við til at tryggja okkara tjóð góð gróðrarlíkindi fyri menning og tryggja okkum sum framkomið samfelag. Í grannalondunum er málið vanliga, at millum 95% og 100% av teimum, sum hava lokið fólkaskúlaprógv, skulu halda fram í eini miðnámsútbúgving. Enn vantar nógv í, til vit koma á somu hædd sum grannalondini á hesum øki. Til tess at náa hesum máli krevst økt fíggjarlig orka.

Útbúgvingarpolitikknevndin er liðug við sítt arbeiði. Hon hevði til uppgávu millum annað at vísa á, hvussu vit fáa størri samvinnu millum útbúgving, gransking og vinnulív, og hvørjar útbúgvingar vit eiga at leggja dent á í framtíðini. Arbeiði nevndarinnar verður kunngjørt í september í ár saman við hinum álitunum í sjálvsstýrisverkætlanini.

## Fólkaskúli

***Løgtingslóg um fólkaskúla***

Løgtingið hevur samtykt uppskot til broytingar í løgtingslógini um fólkaskúlan. Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum ætlar í komandi tingsetu at leggja fyri løgtingið uppskot um aðrar broytingar og rættingar í lógini. M.a. er ætlanin at fremja broytingar í kapittul 6 um fyrisiting av skúlaverkinum, og eftir ætlan skulu broytingarnar koma í gildi 1. januar 2001.

Landsstýrið hevur lýst reglur, sum geva kommunum loyvi til at seta á stovn 1 árs forskúlaflokkar.

***Løgtingslóg um eftirskúlar***

Landsstýrið fer um ársskiftið at leggja fyri tingið uppskot til løgtingslóg um eftirskúla. Ætlanin er eisini at leggja fram uppskot til lóg um eftirskúla fyri menningartarnað.

***Álit um frískúlar***

Landsstýrið fer í næstum at fáa til vega álit um frískúlar við tí í hyggju, at fáa til vega uppskot at leggja fyri tingið til løgtingslóg um frískúlar.

***Løgtingslóg um handarbeiðs- og listaútbúgving***

Arbeiðsbólkur er settur at gera uppskot um, hvussu vit kunnu seta á stovn handarbeiðs- og listaútbúgving í Føroyum. Miðað verður eftir at leggja uppskot til løgtingslóg um nevndu útbúgving fyri tingið í næstum.

***Skúlavegleiðaraskipan***

Skúlaárið 1998/99 hava 22 lærarar verið á eftirútbúgvingarskeiði í skúlavegleiðing. Komandi skúlaár skulu skúlavegleiðarar røkja uppgávuna í fólkaskúlanum at ráðgeva og leiðbeina næmingarnar viðvíkjandi útbúgvingar- og starvsvali.

***Telduvørðir í fólkaskúlanum***

Til tess at útbúgva lærarar til at umsita teldurnar í fólkaskúlanum verður komandi skúlaár farið undir eina eftirútbúgvingarætlan fyri lærarar fólkaskúlans. 21 lærarar eru í fyrstu atløgu tiknir upp til telduvarðaútbúgving, sum røkkur yvir tvey skúlaár. Fyrra árið tekur útbúgvingin 600 tímar og tað seinna 200 tímar, sum fyri tað mesta eru ætlaðir til eina verkætlan, har møguleiki skal verða fyri at skipa fyri smáum serskeiðum. Landið er býtt upp í telduvarðadømi, har telduvørðir skulu verða tøkir at røkja teldur og netskipan í skúlunum, og at leiðbeina lærarum, næmingum og skúlaleiðslunum í tøkniligum og undirvísingarligum spurningum viðvíkjandi KT.

## Miðnám

***Oljuútbúgvingar***

Roknast má við, at vit tey komandi árini mugu seta nógva orku av til menning av útbúgvingum við atliti at oljuvinnuna. Neyðugt verður at uppbyggja ein førleika á hesum nýggja øki, so tað í so stóran mun sum gjørligt ber til at geva føroyingum, sum skulu arbeiða í eini komandi oljuvinnu, tær neyðugu fakligu fortreytirnar.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur tí saman við Føroya Sjómansskúla, Tekniska Skúlanum í Tórshavn, Tekniska Skúlanum í Klaksvík og Maskinmeistaraskúlanum stovnað "Oljuútbúgvingarsamtakið", sum hevur til endamáls at menna tær føroysku útbúgvingarnar og at útbúgva lærarar.

***Kunningartøkni í vinnu- og miðnámsútbúgvingum***
Umráðandi er at útbúgva fólk við førleika innan kunningartøkni, so hetta bæði nøktar tørvin hjá vinnulívinum, og samstundis er ein hjálp hjá teimum ungu, ið fara undir víðari lestur. Tey komandi árini verður tí arbeitt miðvíst við at gera kunningartøkni til ein náttúrligan part í arbeiðinum bæði hjá lærarum og næmingum í vinnu- og miðnámsútbúgvingum. Ætlanin er at gera eina heildarætlan fyri vinnu- og miðnámsskúlaøkið, sum kann skapa karmar fyri menningini á skúlunum og vísa á nýggju møguleikarnar, sum kunningartøkni gevur námsfrøðiliga og fakliga.

Nýggja teldustøðingaútbúgvingin er farin í gongd. Teldustøðingurin kann halda fram til teldufrøðing á Fróðskaparsetrinum eftir teimum tveimum árunum, ið fyrst verða lisin á handilsskúlanum. Áhugin fyri hesi útbúgving er stórur, samstundis sum mett verður, at stórt trot er á fólki við tí førleika, sum henda útbúgving veitir. Ætlanin varð upprunaliga at taka ein flokk upp annað hvørt ár, men fyri at kunna nøkta ein part av tørvinum verður arbeitt ímóti at taka ein nýggjan flokk inn aftur longu í heyst.

***Nýggjur studentaskúli í Tórshavn***
Avgerð er tikin um at byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili í Tórshavn. Avgerðin, um at byggja skúlan í økinum tætt við verandi handilsskúla og tekniska skúla, byggir á, at byggingin verður bíligari, og at skúlarnir fáa møguleika fyri at samstarva innan ymisk øki. Í vár varð ein bygginevnd sett at fyrireika eina arkitektakapping, og roknað verður við, at kappingin verður útskrivað í heyst.

***Almanna- og heilsuútbúgvingar***
Fyrireikingar verða gjørdar til at fara undir nýggjar almanna- og heilsuútbúgvingar, ið fevna um ávikavist heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Stórur tørvur er á at eftirútbúgva ella at uppskúla tey, ið starvast innan hetta økið í dag.

***Útbúgvingarstuðul***
Nýggja lógin um útbúgvingarstuðul, ið veitir eina munandi hægri veiting til næmingarnar, kemur í gildi 1. august í ár.

***Sjóvinnuútbúgvingar***
Arbeiðsbólkar eru settir at endurskoða lógirnar um sjóvinnuútbúgvingarnar. Somuleiðis verður arbeitt við at gera nýggja lóg um fiskivinnuútbúgvingar.

***Skipskokkaútbúgving***
Miðað verður eisini ímóti at stytta verandi skipskokkaútbúgving úr uml. 4 ár niður í uml. 2 ár. Ætlanin er, at tey tvey árini, sum útbúgvingin fer at vara, verða góðskrivað í eini longri kokkaútbúgving á landi.

# Mentan

### *Mentanarpolitisk verkætlan*

Mentan og list eru týðandi fortreytir fyri føroyskum samleika. Sama er at siga um arbeiðið við at varðveita og menna okkara mentanararv. Vit eiga tí nú at skapa ein heildarpolitikk fyri mentan og list – fyri at varðveita og menna okkara mentanararv. Arbeitt verður við at orða og leggja til rættis mentanarpolitisku verkætlanina fyri árini 2000 til 2005. Ætlanin er, at leggja hesa ætlan fyri almenningin fyrst í komandi ári.

Hendan ætlan skal snúgva seg um tann leiklut, sum tað almenna skal hava, tá tað snýr seg um at stuðla skapan og útbreiðslu av mentan og list. Hon skal eisini fevna um ítróttin, ungdómsmentan og eina menningarætlan fyri bókasavnsverkið og siðsøguligu søvnini.

Vit fara longu við komandi fíggjarlóg at taka fyrstu ítøkiligu stigini til ein nýggjan og meira miðvísan mentanarpolitikk. Hetta er sjálvandi treytað av, at undirtøka fæst millum politisku flokkarnar fyri hesum politikki. Hetta verður sagt, tí tað er umráðandi, at tann mentanarpolitikkur, ið vit seta út í kortið, fær so breiða politiska undirtøku sum gjørligt. Hesin politikkur kemur at snúgva seg um nakað, ið vit øll eru felags um uttan mun til politiskan lit, nevniliga okkara felags mentan og samleika. Vit mugu tí finna saman um ein miðvísan og greiðan mentanarpolitikk, sum tað er breið politisk semja um.

Mentanarætlanin skal fevna um mál fyri mentanarpolitikkin í síni heild – um endamál og innihald fyri skapandi list eins og fyri teir stovnar, ið varðveita mentanararvin. Ætlanin skal harnæst fevna um ítøkilig uppskot um tær einstøku listagreinirnar. Henda ætlan skal fevna um uppskot til ítøkiliga verkseting av teimum málum, vit hava sett okkum. Ætlanin skal eisini fevna um raðfestingar. Hon skal hava ein tíðarkarm, og skal vísa, hvat tað kostar árliga at seta ætlanina í verk fyri hvørt økið sær. Til hetta hoyrir eisini spurningurin um, hvønn fjølmiðlapolitikk vit skulu reka í framtíðini.

### *Gransking*

Spurningurin um útbúgving og útbúgvingarpolitikk og spurningurin um gransking og granskingarpolitikk er nær knýttur at mentanarpolitikkinum. Sum nevnt frammanfyri, kemur út drúgv og sera áhugaverd frágreiðing frá útbúgvingarpolitikknevndini við tilmælum um útbúgvingar- og granskingarpolitikk. Vit fara at viðgera tilmælini viðvíkjandi granskingarspurninginum, og fara hesi tilmæli saman við menningarætlan Fróðskaparsetursins at mynda støði undir okkara granskingarpolitikki tey komandi árini.

### *Møgulig oljuvinna og ávirkan hennara á føroyska mentan*

Verður olja funnin á okkara land- ella sjóøki kann hetta merkja eina búskaparliga, sosiala og mentanarliga kollvelting. Landsstýrið fer í næstum at seta ein arbeiðsbólk at útgreina avleiðingarnar av oljvinnuni fyri føroyska mentan.

### *Norðurlendskt mentanarsamstarv*

Norðurlendska mentarsamstarvið hevur stóran týdning fyri føroyskt mentanarlív. Føroyar hava tikið virknan lut í hesum samstarvi, og fara vit framvegis at virka fyri øktum mentanarligum samstarvi millum Norðurlond og í hesum sambandi ikki minst ímillum londini í Útnorðuri. Avtala er gjørd millum Føroyar, Ísland og Grønland um ávís samstarvsøki, og nýliga er avtalað at kanna møguleikarnar fyri øktum samstarvi.

***Kirkjan***

Arbeiðið hjá nevndini, ið ger uppskot til føroyska lóggávu fyri kirkjuna, gongur sum ætlað, og væntandi verður álitið hjá nevndini liðugt um ársskiftið.

# PARTUR III

## Løglisti

### Løgmansskrivstovan

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um kommunur
Uppskot til ríkislógartilmæli um endurgjaldsábyrgd
Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í rættargangslógini
Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í útlendingalógini
Frágreiðing um sjálvstýrismál
Frágreiðing um norðurlandamál
Frágreiðing um hernaðarmál

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram næsta ár:***
Uppskot til broytingar í navnalógini
Uppskot til broyting í løgtingslóg um almennar og privatar skráir
Uppskot til broyting í løgtingslóg um vedding
Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í revsulógini
Uppskot til ríkislógartilmæli um Schengen
Uppskot til ríkislógartilmæli um dagføring av familjurættarligu lóggávuni
Sáttmáli við Danmark
Sáttmálar við onnur lond
Frágreiðing um uttanlandsmál

### Fíggjarmálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2000
Uppskot til eykaløgtingsfíggjarlóg fyri 1999
Uppskot til løgtingslóg um kolvetnisskattafyrisitingarlóg
Uppskot til løgtingslóg um arvaavgjøld
Uppskot til løgtingslóg um umskipan av skuld til tað almenna
Uppskot til broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum
Uppskot til broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.
Uppskot til broyting í løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting
Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt
Uppskot til broyting í løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur
Uppskot til broyting í løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald
Uppskot til broyting í løgtingslóg um rentutrygging
Uppskot til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald
Uppskot til broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju

Uppskot til broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar
Uppskot til broytingar í Banka- og Sparikassalógini
Uppskot til løgtingslóg um virðisbrævameklarafeløg
Uppskot til løgtingslóg um íløgufeløg

## Fiskimálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum
Uppskot til broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap (lógaruppskot í tveimum pørtum)
Uppskot til broyting í løgtingslóg um fiskivinnuráð
Konvensjón um vernd og umsiting av millumøkjastovnum og víðaferðandi fiskastovnum

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram næsta ár:***
Uppskot til løgtingslóg um skipatryggleikan
Uppskot til løgtingslóg um sigling og merking á sjónum
Uppskot til broytingar í sjólógini
Frágreiðing um fiskivinnumál

## Vinnumálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um postvirksemi og umlegging av Postverki Føroya
Uppskot til løgtingslóg um gerð av føstum sambandi um Vestmannasund
Uppskot til løgtingslóg um Føroya Lívstrygging
Uppskot til løgtingslóg um avtøku av Menningargrunni Ídnaðarins
Uppskot til løgtingslóg um vatn í undirgrundini
Uppskot til løgtingslóg um avtøku av lóg um avmarking av løn í samband við sjúku (karensdagalógin)

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram næsta ár:***
Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi
Uppskot til løgtingslóg um sundurbýti av føstum eigindómum
Uppskot til broytingar í løgtingslóg um ferðslu
Uppskot til broytingar í løgtingslóg um Ferðaráð Føroya
Uppskot til broytingar í ymiskari jarðarlóggávu
Frágreiðing um landbúnaðarmál

## Oljumálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um øki og treytir fyri fyrsta útbjóðingarumfar í kolvetnisvirksemi.

## Almanna- og Heilsumálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um gjald á stovni o.a
Uppskot til løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
Uppskot til løgtingslóg um eftirlønaruppsparing
Uppskot til løgtingslóg um Vanlukkutrygging
Uppskot til løgtingslóg um dagpening
Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgingarráð
Uppskot til løgtingslóg um forsorg og barnaforsorg
Uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum
Uppskot til løgtingslóg um fyriskipanir fyri børn og ung
Uppskot til broyting í løgtingslóg um sjúkrakassar
Uppskot til broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunnin
Uppskot til ríkislógartilmæli um rættindi sjúklinga
Uppskot til ríkislógartilmæli um at frátaka frælsisrættindi og annan tvingsil innan psykiatriina
Konventión evroparáðsins um mannarættindi og biomedisin

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram í ár:***
Uppskot til løgtingslóg um ítrótt, ítróttarbygningar- og -vøllir
Uppskot til løgtingslóg um Mentanargrunn Føroya Løgtings
Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
Uppskot til broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya
Sáttmáli um fría atgongd millum hægri útbúgvingar í Norðurlondum

***Mál, ið ætlanin er at leggja fram næsta ár:***
Uppskot til løgtingslóg um eftirskúla.
Uppskot til løgtingslóg um eftirskúla fyri menningartarnað
Uppskot til løgtingslóg um frískúlar
Uppskot til løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgvingar
Uppskot til løgtingslóg um navigatørútbúgvingar
Uppskot til løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað
Uppskot til løgtingslóg um skipskokkaútbúgving
Uppskot til løgtingslóg um leiklist
Uppskot til løgtingslóg um læraraútbúgving
Uppskot til broyting í løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn
Uppskot til broyting í løgtingslóg um friðan av fornminnum
Uppskot til broyting í løgtingsóg Føroya Landsbókasavn